| | Blað nr.: 1 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. januar 2022 | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. januar 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 1/22-17/22

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Ruth Vang
Birita Baldvinsdóttir Iversen
Rói Bjarnason Poulsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. januar 2022 | Blað nr.: 2 |
| | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 1/22 | 22/00450-1 | Bjørg Dam bert frá at møta á býráðsfundi 27. januar 2022 | 3 |
| 2/22 | 22/00465-1 | Birgir Nielsen bert frá at møta á býráðsfundi 27. januar 2022 | 4 |
| 3/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 5 |
| 4/22 | 21/05134-3 | Víðarisøla matr.nr. 56ch, Kirkjubøur - Argir. | 6 |
| 5/22 | 21/05317-2 | Víðarisøla matr.nr. 1æo, Hoyvík. | 8 |
| 6/22 | 19/00290-2 | Leigumál við Føroya Ríðingarfelag viðvíkjandi Spíranum | 10 |
| 7/22 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 15 |
| 8/22 | 17/01886-1 | Svimjihøllin – dagføring av gjøldum | 26 |
| 9/22 | 22/00017-1 | Gundadalshøllin: Útbygging v.m. | 32 |
| 10/22 | 21/02652-1 | Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu | 34 |
| 11/22 | 21/05093-3 | Forskúli í Eysturskúlanum | 45 |
| 12/22 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 49 |
| 13/22 | 21/00676-7 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn | 59 |
| 14/22 | 17/03628-1 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 62 |
| 15/22 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 67 |
| 16/22 | 20/03466-1 | Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a | 74 |
| 17/22 | 21/04713-1 | Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir | 78 |
| 18/22 | 22/00358-80 | Argja kirkja : Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum - matr. nr. 56a og 115, Argir - broyting av byggisamtyktini (2006-0769) | 82 |

**Til viðgerðar**

## 1/22 Bjørg Dam bert frá at møta á býráðsfundi 27. januar 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 1/22 | 22/00450-1 |

**Málslýsing**
Bjørg Dam hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

## 2/22 Birgir Nielsen bert frá at møta á býráðsfundi 27. januar 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 2/22 | 22/00465-1 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rói B. Poulsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 3/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læTtar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

# 4/22 Víðarisøla matr.nr. 56ch, Kirkjubøur - Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 1/22 | 21/05134-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 4/22 | 21/05134-3 |

**Upprunin til málið.**

Umsókn frá Advokati. Um at kommunan loyvir víðarisølu av óbygdum grundstykki. Matr.nr. 56ch, Kirkjubøur,Argir.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 56ch, Kirkjubøur – Argir. Vídd 982m2. Grundstykkið er útgrivið og planerað. Bygningur hevur staðið á ognini, men brendi hesin bygningurin í 2005, og er nú bert betonggólvið eftir. Núverandi eigari hevur havt grundstykkið til sølu, og fyriliggur nú nýtt søluskeyti. Síðani 2005 er grundstykkið selt nakrar ferðir, men hevur ongin av hesum eigarum bygt á grundstykkinum, sum tó hevur verið brúkt til vinnuligt virksemi øll árini.

Uppruna skeytið er tinglýst 12.05.1987, og var ta táverandi Argja kommuna sum stóð fyri søluni.

Sambært skeytinum, framgongur millum annað, at bygging á økinum kann bert nýtast til handilsvirksemi og vanligt vinnuvirksemi o.t. Í samband við byggingina er loyvt at byggja íbúðir á ovastu hædd.

Um byggifreist er henda áseting.

Eigarin av hesum eigindómi bindur seg til at fullfíggja sína bygging ella góðkent 1. stig av henni innan 2 ár eftir, at hetta skeytið er undirskrivað, og kann eigarin ikki selja stykkið aftur, fyrr enn henda treyt er uppfylt.

Verður ikki gjørt, sum her ásett, kann Argja kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur ímóti fullum endurgjaldið av dokumenteraðum útreiðslum hjá eigaranum við rentu 6 % p.a. frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin.

Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Argja kommuna eigaranum dokumenteraðar útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda.

Søluprísurin í 1987 var kr. 410.476,00

í uppruna skeytinum framgongur, at stykkið er útgrivið lutvíst, og at keyparin hevur fingið endurgjald fyri grót, sum Argja Kommuna hevur tikið av stykkinum. Ongin uppgerð fyriliggur um, hvønn kostnað táverandi keypari hevur havt av planering av stykkinum.

Við 6 % í rentu frá 1987 til 2021, verður møgulig afturtøku upphædd 3. mill. kr. + harumframt dokumenteraðar útreiðslur til planering v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Kommunan loyvdi hin 27. september 2018, víðarisølu av grundstykkinum. Sí mál 18/03178

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna víðarisølu av ognini matr.nr. 56ch, Kirkjubøur,Argir.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

# 5/22 Víðarisøla matr.nr. 1æo, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 3/22 | 21/05317-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 5/22 | 21/05317-2 |

**Upprunin til málið.**
Umsókn frá Advokati, um loyvi til víðarisølu av matr.nr. 1æo, Hoyvík.. Umsókn dagfest 22. 12.2021.

**Lýsing av málinum.**
Vinnugrundstykki á Hjalla. Vídd 1.500m2.
Grundstykkið er planerað. Fundamentir eru bygd. Kloakkir og installatiónir eru lagdar inn um fundament.

Verandi eigari hevur keypt stykkið í 2002. Táverandi keypsprísur var 0,896 mill. kr. Ognin er við loyvi frá TK. handlað millum feløg í konsern í 2018. Sí Býráðssamtykt 27.09.2018 ( mál 18/03064 – 3 )

Í útstykkingini er hesin servittur tinglýstur viðv. freist um bygging, sølu og møguligt afturkeyp.

d.) Eigarin av hesum eigindómi bindur seg til at fullfíggja sína bygging ella góðkent 1. stig av henni innan 4 ár eftir, at byggibúningin er lokin, og kann eigarin ikki selja stykkið víðari, fyrrenn henda treyt er uppfylt.

e. ) Verður ikki gjørt sum ásett í pkt. d, kann Tórshavnar kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur ímóti fullum endurgjaldi av dokumenteraðum útreiðslum hjá eigaranum við rentu 5% p.a. frá yvirtøkudegnum at rokna hetta tó í frysta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin. Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Tórshavnar Kommuna keyparanum dokumenteraðu útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda.

Semjast partarnir ikki um hetta og /ella um endurgjaldið, verður tað at áseta av einum gerðarrætti, har Tórshavnar kommuna útmeldar 1 lim, keyparin 1, meðan triði limurin, ið er formaður, verður útnevndur av Føroya rætti.

Sambært víðarisøluskeytinum, selur verandi eigari grundstykkið í tí standi tað er, við fundamentum, kloakk og installatiónum sum eru lagdar inn um fundament fyri 3,5 mill. kr.

Um kommunan skal keypa stykkið aftur, verður rentað roknað 5 % av keypsprísi 0,896 mill. kr. frá 2002 til d.d. Mettur keypsprísur íroknað rentum er 2,3 mill. kr. + útreiðslur sum verandi eigari hevur havt til byggibúning/bygging á grundstykkinum. Kommunan hevur ikki innlit í hesar útreiðslur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læuttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisølu av matr.nr. 1æo, Hoyvík. Sí skeyti j.nr. 21/05317-5.

**Fíggjarnevndin 19. Januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

# 6/22 Leigumál við Føroya Ríðingarfelag viðvíkjandi Spíranum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 12/19 | 19/00290-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 19/00290-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 64/20 | 19/00290-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 76/20 | 19/00290-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 22.02.2021 | 38/21 | 19/00290-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 69/21 | 19/00290-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 83/21 | 19/00290-2 |
| 8 Mentamálanevndin | 12.01.2022 | 21/22 | 19/00290-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 11/22 | 19/00290-2 |
| 10 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 6/22 | 19/00290-2 |

**Upprunin til málið:**
Endurnýggjan av avtaluviðurskiftum um felagshúsi Føroya Ríðingarfelags, staðseting av fyribilshølum (Spírin) og atknýttum virksemi í økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur havt sáttmála við Føroya Ríðingarfelag um leigu av hølum til dagstovnavirksemi síðani 1997. Í 2014 varð gjørd ískoytisavtala um staðseting av fyribilshølum til Spíran, ið virkar sum frítíðarskúli til børn í Skúlanum á Fløtum. Henda avtala gekk út í august 2018.

Tørvur er á at leingja leigusáttmálan til Skúlin á Fløtum er liðugt bygdur, og í hesum sambandi er nýggjur sáttmáli skrivaður, sum fevnir um felagshúsi, fyribilshølini og uttandura virksemið.

Ynskið hevur eisini verið at skipa ávís viðurskifti betri, serliga í mun til uttanduravirksemið hjá Spíranum á økinum hjá Føroya Ríðingarfelag. Harumframt hevur felagið ynskt at dagføra leigugjaldið, sum í mong ár hevur verið kr. 6.000 um mðr. Í nýggju avtaluni er leigugjaldið sett til kr. 8.000 um mðr. Játtan til leigugjaldið er tøk í fíggjarætlanini 2019 á kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing.

Endamálið við frítíðarskúla á økinum hjá Føroya Ríðingarfelag er burtur, tá frítíðarskúlin í Skúlanum á Fløtum er liðugur. Ásett er tí, at leigumálið endar 31. desember 2020, ið gevur kommununi neyðugt skotbrá at flyta fyribilshølini av økinum eftir summarfrítíðina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Við støði í virkseminum hjá Spíranum í Havnardali eru uppskot sett fram um at skipa serstakt námsfrøðiligt náttúrutiboð til børn og ung. Vísast kann til málini 15/04853 og 16/02345, har tað eisini er arbeitt við at finna hóskandi staðseting til eitt slíkt virksemi, og hvussu tað møguliga kann skipast.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Leiguavtalan við Ríðingarfelagið um Spíran, ið virkað hevur sum frítíðarskúli, gongur út á nýggjárinum. Í sambandi við ráðlegging av virkseminum, tá byggingin av Skúlanum á Fløtum verður tikin í nýtslu, er áheitan komin frá skúlaleiðsluni og frítíðarskúlaleiðsluni í Skúlanum á Fløtum um framhaldandi at brúka Spíran í Havnardali til skúla- og frítíðarskúlavirksemi teirra ella alternativt at flyta Spíran til øki nær Skúlanum á Fløtum.

Leiðslurnar vísa í hesum sambandi til byggiskránna fyri Skúlan á Fløtum (pkt. 2.3), har tað er skrivað: *Skúli og frítíðarskúli eru felags um grunddeildina. Í grunddeildini eru verkstaðir til frítíðarskúlavirksemi, men sum eisini kunnu brúkast til skúlavirksemi. Karmarnir í verandi frítíðarskúla "Spíranum í Havnadali" verða framhaldandi partur av Skúlanum á Fløtum, og kann frítíðarskúlin sostatt nýta Spíran í framtíðini. Dentur verður lagdur á at samskipa virksemið hjá frítíðarskúla og skúla í tilgongdini."*

Skúlaleiðslurnar vísa á, at nevndu verkstaðir í grunddeildini eru ikki við í byggiverkætlanini, nú bygt verður. Meting teirra er, at grunddeildin tí verður ov lítil til allan frítíðarskúlan og rúmar kanska bert tveimum

árgangum. Í byggiskránni pkt. 6.1 er annars skrivað, at *“Í grunddeildini er forskúli, 1.-3. flokkur og frítíðarskúli fyri allar flokkarnar.”*

Umsitingin hevur á fundi við leiðslurnar umrøtt spurningin. Umsitingin metir, at grunddeildin framvegis rúmar frítíðarskúlanum sum ætlað, men at møguligur hølistørvur kann loysast í øðrum hølum í skúlanum. Spírin rúmar ikki heilum árgangi.

Umsitingin ásannar tó, at grunddeildin á Fløtum er tann fyrsta av sínum slag í kommununi, har skúli og frítíðarskúli eru saman um somu høli. Hetta krevur nýhugsan og neyvt samstarv bæði leiðsluliga, fakliga og viðvíkjandi karmum annars. Komandi skúlaár byrja harumframt tveir forskúlaflokkar á Fløtum, sum eisini er nýtt virksemi, eins og at tað er fyrstu ferð, at frítíðarskúlin til Skúlan á Fløtum hevur øll børn og starvsfólk undir somu lon.

Á fundinum varð breið semja um uppskot at geva leiðslunum tvey ár at skipa samlaða virksemið soleiðis, at bæði skúli og frítíðarskúli húsast í grunddeildini og skúlanum annars, og at Spírin í hesum tíðarskeiði verður til at taka. Tá ráðleggingin til komandi skúlaár er komin nakað longri, kann harumframt støða takast til, um frítíðartilboðið til 3. flokk í fyrsta umfari ikki flytur inn, men heldur fram í Margarinfabrikkini.

Vísandi til, at leiguavtalan við Ríðingarfelagið gongur út, verður neyðugt at leingja avtaluna til at fevna um árini 2021-2022 eisini. Ábendingar eru um, at felagið er sinnað til tess.

Sum kunnugt liggur annað mál til viðgerðar um Spíran sum námsfrøðiligt náttúrutilboð til børn og ung í kommununi (mál 16/02345). Umsitingin er biðin um at gera uppskot til konsept tí viðvíkjandi, har eisini onnur staðseting enn tann verandi í Havnardali er partur av málinum.

Umsitingin metir, at hóast Spírin komandi tvey árini er knýttur til virksemið í grunddeildini hjá skúlanum og frítíðarskúlanum á Fløtum, so eigur at verða arbeitt víðari við ætlanini um námsfrøðiligt náttúrutilboð ætlað øllum børnum og ungum.

Upplýsast skal, at á omanfyri nevnda fundi høvdu leiðslurnar báðar eisini ynski um at skipa eitt náttúrutilboð knýtt beinleiðis at Skúlanum á Fløtum, har bygningur og lendi v.m. í nánd av skúlanum má fáast til vega.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa heimild til at samráðast við Føroya Ríðingarfelag um at leingja leiguavtaluna at fevna um árini 2021-2022 soleiðis, at Skúlin á Fløtum og Frítíðarskúlin á Fløtum kunnu brúka Spíran í Havnardali sum liður í at skipa alt skúla- og frítíðarskúlavirksemið í sjálvum Skúlanum á Fløtum innanfyri hetta tíðarskeið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at felagshúsið aftur verður gjørt tøkt hjá Spíranum at brúka.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið við Ríðingarfelagið um at leingja leiguavtaluna, sum fevnir um bæði felagshús og økið, har fyribilsbygningarnir hjá kommununi standa umframt útiøkið.

Felagið tekur undir við at leingja avtaluna fram til 31. desember 2022 fyri sama leiguprís. Gjørdar eru nakrar innihaldsligar broytingar í avtaluni til tess at heimila, at tað umframt Frítíðarskúlan á Fløtum eisini er møguligt hjá Skúlanum á Fløtum at brúka hølini. Tí er lagt upp til at samtykkja nýggja leiguavtalu, ið tekur við undirskrivingardagin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja leiguavtaluna og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum, men at leigumálið verður stytt til 31. desember 2021.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum frá meirilutanum í mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini til fundin í mentamálanevndini 11. mars 2020.

**Ískoyti:**
Annfinn Brekkstein, nevndarformaður, skjýtur upp at leingja leigusáttmálan við Føroya Ríðingarfelag viðvíkjandi felagshúsinum og Spíranum, og í hesum sambandi at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til leigusáttmála at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 22. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til mál 21/00394 Innskriving skúlaárið 21/22 um at taka upp fýra 1. flokkar til Skúlan á Fløtum næsta skúlaár, varð í mentamálanevndini samtykt, at Spírin í Havnardali skal vera partur av hølisloysnini fyri frítíðarskúlan.

Føroya Ríðingarfelag er sinnað at leingja verandi leigusáttmála við tveimum árum til 31. desember 2023 við somu ásetingum og treytum. Hetta verður tí gjørt sum ískoyti til verandi sáttmála.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at leingja verandi leigusáttmála til 31. desember 2023 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Samskiftið hevur verið við Føroya Rìðingarfelag um hølisviðurskiftini hjá Spíranum, sum er frítíðarskúli hjá børnunum í 2. flokki á Fløtum. Næsta skúlaár eru 4 flokkar i 2. flokki á Fløtum, hetta krevur víðkan av hølisumstøðunum, men sum heild er eisini tørvur á betri umstøðum til frítíðarskúlavirksemið har.

Samskifti hevur verið við Ríðingarfelagið um møguleikar fyri betri hølisloysn, har Spírin eisini kann vera verandi á økinum eitt longri áramál.

Felagið hevur boðað frá, at tað er sinnað at byggja út verandi felagshús soleiðis, at bæði frítíðarskúlin og felagið fáa betri umstøður. Partur av hesi ætlan er, at frítíðarskúlin fær ávís høli til teirra nýtslu burturav.

Felagið hugsar at byggja út uml. 120-140 m2 og miðar eftir fermetraprísi uml. kr. 25-30.000. Felagið kundi hugsað sær 10 ára leigusáttmála, har gjaldið frá kommununi er kr. 25.000 um mðr, tá er verandi leigugjald fyri felagshúsið kr. 8.000 íroknað.

Umrøtt varð eisini trygdarviðurskiftini í økinum, serliga hvat børnunum viðvíkur. Felagið hevur ynski um, at at barnatalið má ikki fara upp um 90 børn, og at hetta verður sett í leigusáttmálan.

Málið hevur skund, skal tað eydnast at fáa hølini at brúka í hesum árinum.

Skotið verður upp, at umsitingini verður givin heimild at gera leigusáttmála við støði í verandi leigusáttmála soleiðis, at nýggi sáttmálin tekur við, tá frítíðarskúlin kann taka hølini í nýtslu og 10 ár fram ella til endan á skúlaárinum 2032-33 (1. august 2033). Harumframt at, samlaða leigugjaldið verður kr. 25.000 um mánaðin.

Í tann mun, at leiga fellur til gjaldingar í hesum árinum, kann verða neyðugt við nýggjari fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at geva umsitingini heimild at gera leigusáttmála við Føroya Ríðingarfelag um leigu av felagshúsi Føroya Ríðingarfelags í 10 ár (til endan av skúlaárinum 2032-33), og at leigukostnaðurin verður kr. 25.000 um mánaðin. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

# 7/22 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 79/18 | 16/00962-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 63/18 | 16/00962-1 |
| 13 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 38/18 | 16/00962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 258/18 | 16/00962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 217/18 | 16/00962-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 255/18 | 16/00962-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 334/20 | 16/00962-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 336/20 | 16/00962-1 |
| 19 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 307/20 | 16/00962-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 10/21 | 16/00962-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 98/21 | 16/00962-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 87/21 | 16/00962-1 |
| 23 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 118/21 | 16/00962-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 12.01.2022 | 19/22 | 16/00962-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 7/22 | 16/00962-1 |
| 26 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 7/22 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:
- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:
- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**
Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri

leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa bygginina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió

2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-byggingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.
**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður byggingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |

| | | |
|---|---|---|
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 25. januar 2018 samtykti býráðið at góðkenna uppskot til partalagssáttmála, at góðkenna uppskot til høvuðsarbeiðstakarasáttmála, og at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya, og í hesum sambandi at játta kr. 62,990 mió íroknað kommunalt mvg til byggingina av vestursíðuni á Tórsvølli.

Eftir hesa býráðssamtykt hevur FSF boðað kommununi frá samtykt í starvsnevnd FSF´s um, at FSF vil broyta byggiverkætlanina soleiðis, at verandi FSF-hús á vestursíðuni ikki verður út- og umbygt sum ætlað, men ístaðin verður tikið niður og at nýtt hús verður bygt uppaftur á staðnum.

Endamálið við hesi broyting er at fáa eina betri bygging bæði viðvíkjandi innrætting og funktiónum. Fyrimunur er eisini, at hæddirnar á vestursíðuni verða bundnar saman við suðurendan í somu linju, tí meðan verandi bygningur hevur fýra hæddir, verður tann nýggi at hava tríggjar hæddir eins og suðurendin.

Harumframt minkar broytta ætlanin munandi um váðan í byggingini serliga við atliti at avbjóðandi lendinum.

Fótbóltssambandið hevur í hesum sambandi boðað kommununi frá, at mettur meirkostnaður fyri hesa ætlan er kr. 25,0 mió, og at Fótbóltssambandið sjálvt vil fíggja henda meirkostnað. Fíggjarligi parturin hjá Fótbóltssambandinum av samlaðu byggingini á vestursíðuni verður eftir hesum uml. kr. 84,3 mió.

Hetta merkir tó, at verkætlanin er ikki heilt tann sama, sum býráðið samtykti á síðsta fundi út frá fyriliggjandi skjølum.

Í sambandi við fyrireikingarnar at prosjektera vestursíðuna varð henda ætlan at byggja nýtt hús heldur enn at út- og umbyggja verandi hús viðgjørd. Semja var um, at hetta er ein uppá allar mátar betri loysn, men hon kundi ikki fremjast innanfyri tann fíggjarkarm, ið verkætlanin tá hevði.

Nú Fótbóltssambandið hevur samtykt at fíggja hesa broyting, verður mælt býráðnum til at broyta verkætlanina soleiðis sum lýst omanfyri, harundir at broyta tilhoyrandi partalagssáttmálan, høvuðsarbeiðstakarasáttmálan og samstarvsavtaluna við Fótbóltssambandið, men har játtanin hjá kommununi framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at samtykkja verkætlanina soleiðis broytt og at tilhoyrandi skjøl – partalagssáttmáli, høvuðsarbeiðstakarasáttmáli og samstarvsavtala við Fótbóltssambandið verða broytt samsvarandi. Harumframt verður mælt til at staðfesta, at játtanin hjá kommununi til byggiverkætlanina á vestursíðuni á Tórsvølli framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til samstarvsavtaluna millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu grein 5 um fíggjarligu viðurskiftini. Sambært hesum rindar kommunan sín part av íløgukostnaðinum í pørtum soleiðis, at í 2025 er alt goldið. Byggingin er ætlað at verða liðug í 2020/21.
Fótbóltssambandið hevur sent fyrispurning til kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari. Fótbóltssambandið greiðir frá, at til tess at fíggja byggingina, bæði meðan bygt verður og árini fram til 2025, noyðist Fótbóltssambandið at taka upp lán fyri partin hjá kommununi, ið ikki er goldin.
Í hesum sambandi er Fótbóltssambandið í gongd við at kanna tilboð frá fíggjarstovnum. Greitt er, at Fótbóltssambandið skal bera týðandi fíggjarkostnaðir av hesum. Lagt verður aftrat, at Fótbóltssambandið virðir avtaluna og góða samstarvið við kommununa um Tórsvøll, men loyvir sær at spyrja kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari.
Sbrt. grein 5 í avtaluni, so kann kommunan gjalda gjøldini skjótari. Higartil hevur kommunan veitt 10 mkr. í fígging av 62,990 mkr. Uppskot hjá Fótbóltssambandinum er, at kommunan t.d. rindar 33 mkr. nú ella næsta ár, og restina 19,990 mkr. árini 2020-21, so at byggingin verður ikki verður óneyðuga dýrkað av fíggjarkostnaðum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at broyta gjøldini soleiðis, at 33 mkr. verða játtaðar í 2018 av tøkum peningi. Harumframt verður mælt til at játta 10 mkr. av íløgujáttanini fyri 2020 og 9,990 mkr. í íløgujáttanini fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Ískoyti:
Byggingin av vestursíðuni verður liðug uml. 21. juni 2021, sum er 4 mðr. seinni enn upprunaliga ætlað. Orsøk til hetta er spilldagar serliga viðvíkjandi veðrinum, koronatíðarskeiðnum í vár og avbjóðingar við leveransum.

Umsitingin hevur saman við Fótbóltssambandinum viðgjørt møguleikan um forseringsavtalu (framskunding), harundir at gera verkætlanina endaliga upp.

Fyri FSF hevur forseringin týdning, tí at Tórsvøllur tíðliga í mai 2021 fyri fyrstu ferð skal verða karmur um stóra EM-endakapping í Føroyum. Talan er um U17-kvinnur, har føroyska U17-kvinnulandsliðið eisini tekur lut saman við 7 øðrum londum. FSF hevur lagt nógv fyri at gerast vertir fyri enn størri altjóða kappingum enn bólkaspølini og einstøku landsdystirnir, sum hava verið higartil, og fyri býin er hetta eisini av størstu altjóða tiltøkum.

Fyri kommununa hevur forseringin eisini týdning, at tað so tíðliga sum gjørligt ber til at byrja uppá arbeiðið at skifta graslíkið á Niðara vølli, tá byggiplássið er farið av vøllinum, tí arbeiði væntast at taka eina 8 vikur.

Samráð hevur verið við arbeiðstakaran og høvuðsráðgevan um forseringsavtalu og treytir í tí sambandi. Til ber at framskunda liðuggerð av byggingini til 7. apríl fyri ein samlaðan kostnað uppá kr. 3,55 mió ráðgeving og kommunala projektleiðslu íroknað.
Harumframt er aðrir kostnaðir í sambandi við byggiætlanina, ið tørva fígging.

Tá arbeiðið varð byrjað, vórðu kommunan og FSF samd um at tekna projektábyrgdaratrygging, sum ikki var við í upprunaligu fíggingini. Kostnaðurin av hesi trygging er kr. 0,79 mió íroknað tryggingarráðgeving. Aftrat eru eisini meirútreiðslur til keyp av tribunustólum og innbúgvi kr. 0,6 mió.

Forsering, tryggingarkostnaður og hinir nevndu kostnaðirnir er tilsamans kr. 4,94 mió u/mvg, sum ætlanin er, at FSF og kommunan býta í helvt, so sum gjørt er upprunaliga. Við kommunalum mvg er parturin hjá kommununi kr. 2,62 mió.

Gjørt verður í hesum sambandi ískoyti til grein 5 í samstarvsavtaluni við FSF viðv. byggingini av vestursíðuni, har samlaði parturin hjá kommununi verður broyttur frá kr. 62,99 mió v/mvg til kr. 65,61 v/mvg. Avtalað er eisini, at kommunan rindar tær kr. 22.610.000, forseringskostnaðurin íroknaður, sum eftir eru at gjalda, soleiðis:
- 2023 kr. 9.120.000
- 2024 kr. 8.000.000
- 2025 kr. 5.490.000

Haraftrat skal gerast ískoytissáttmáli við arbeiðstakara og høvuðsráðgevan um forseringina.

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Íløgujáttan sambært samstarvsavtalu fellur árini 2023-2025.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 22.610.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2023-2025 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **Lokað verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 5775 | L57026 | | 5775 | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja ískoytisavtaluna við FSF, har samlaði verkætlanarkostnaðurin hjá kommununi er settur til kr. 65,61 mió v/mvg. Mælt verður til, at restfíggingin verða játtað soleiðis:

kr. 9.120.000 í íløguætlanini fyri 2023,
kr. 8.000.000 í íløguætlanini fyri 2024, og
kr. 5.490.000 í íløguætlanini fyri 2025.

Harumframt verður heimilað kommununi saman við FSF at gera ískoytisavtalur við arbeiðstakara og høvuðsráðgeva um forseringina.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin við hesum er gjørd endaliga upp í mun til krøv samsvarandi sáttmálunum áðrenn verksetan.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært býráðssamtyktini 25. oktober 2018 og samstarvsavtaluni millum kommununa og FSF sum byggiharrar skuldi kommunan gjalda kr. 10 mió í 2020 og kr. 9,99 mió í 2021 til byggingina av vestursíðuni. Býráðssamtyktin 17. desember 2020 broytir hetta soleiðis, at gjøldini, tilsamans kr. 22,61 mió forseringsavtala íroknað, falla árini 2023-2025.

FSF ger í hesum sambandi vart við, at FSF við samtyktini 17. desember 2020 skal leggja hesar upphæddir út fyri kommununa, og at neyðugt verður við lántøku, ið hevur rentuútreiðslur við sær uppá uml. kr. 0,75 mió. FSF heitir á kommununa um nýggja viðgerð soleiðis, at kommunala fíggingin fellur samstundis, sum byggingin er liðug, tvs. í 2021 og sostatt í samsvari við samstarvsavtaluna frá 2018.

Omanfyri nevnda avtala um forsering er ikki sett í verk, og á stýrisbólkafundi er upplýst, at tó at arbeitt er eftir tíðarætlanini sbrt. ætlaðu forseringsavtaluni, har byggingin skuldi verða liðug 7. apríl 2021, so fer tað ikki at halda. Kommunan og FSF sum byggiharrar umrøða støðuna, harundir endauppgerð fyri samlaða kostnaðin, sum so semja má fáast um millum byggiharrarnar eins væl og við arbeiðstakara og høvuðsráðgeva.

Kommunan hevur í samstarvsavtaluni við FSF frá 2018 bundið seg til at gjalda kr. 19,99 mió árini 2020 og 2021, sum tó ikki eru játtaðar í íløguætlanini. Mett verður skilabest fyri bæði kommununa og FSF, at fíggingin verður fingin til vega. Uppskot er, at fígging verður fingin til vega av langhylsverkætlanina, sum mett verður ikki hevur tørv á allari íløgujáttanini í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at játta kr. 19,99 mió av projektkontu L57015 Svimjihøll (langhylsverkætlanin) til kontu L57026 Tórsvøllur vestursíðan.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið og tilmælið til fundin 10. februar 2021. Skotið verður upp at játta helvtina av fíggjartørvinum, tvs. kr. 10 mió nú, og at írestandi upphæddin verður tikin uppaftur við seinni høvi. Mett verður, at til ber at fíggja hetta av tøkari játtan í langhylsverkætlanini. Talan er um flyting av játtan innan somu høvuðskontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 10 mió av L57015 Svimjihøll (langhylur) til L57026 Tórsvøllur vestursíðan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í løguætlanini fyri 2022 eru settar kr. 13 mió av til Tórsvøll vestursíðan á løgukarmi 5772 Ítróttaranlegg LK57026.

Í sambandi við upprunaliga avtaluna við Fótbóltssambandið samtykti býráðið 1. mars 2018 ein samlaðan útreiðslukarm fyri kommununa uppá kr. 62,990 mió kommunalt mvg íroknað. Í ískoytisavtalu við Fótbótssambandið hevur býráðið í samtykt 7. desember 2020 síðani hækkað samlaða útreiðslukarmin til kr. 65,61 mió kommunalt mvg íroknað.

Av hesum manglar kommunan at rinda kr. 12,61 mió.

Byggingin av vestursíðuni er liðug. Endaligur byggiroknskapur verður lagdur fyri, so skjótt hann er liðugur. Fyribils kann staðfestast ein avmarkað meirnýtsla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta kr. 13 mió av løgukarmi 5775 LK57026 til løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L57026 Tórsvøllur vestursíðan, og í hesum sambandi at flyta Fótbóltssambandi Føroya kr. 12,61 mió. Málið verður at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Tó verður peningurin ikki útgoldin, fyrenn semja er um eina endaliga uppgerð fyri byggingina.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

## 8/22 Svimjihøllin – dagføring av gjøldum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 178/17 | 17/01886-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 156/17 | 17/01886-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 167/17 | 17/01886-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 141/18 | 17/01886-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 6/19 | 17/01886-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 40/19 | 17/01886-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 166/19 | 17/01886-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 128/19 | 17/01886-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.09.2019 | 237/19 | 17/01886-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 247/21 | 17/01886-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 03.11.2021 | 257/21 | 17/01886-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 286/21 | 17/01886-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 319/21 | 17/01886-1 |
| 14 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 8/22 | 17/01886-1 |

**Málslýsing:**
Prísirnir í Svimjihøllini í Gundadali eru ikki broyttir síðani 2009. Sí galdandi prísskrá her: http://www.svimjihollin.fo/prisir.html

Mett verður hóskandi at fáa dagført prísirnar nakað og soleiðis tryggja framhaldandi hóskandi býtið millum nettofíggingina á árligu fíggjarætlanini og inntøkurnar frá kundunum í høllini, umframt at tryggja gott fíggjarligt grundarlag fyri framhaldandi menning av tænastuni og hentleikunum í høllini.

Leiðslan í Svimjihøllini mælir til fylgjandi broytingar í prísskránni:

- Gjaldið fyri børn verður hækkað úr 12 kr. til 15 kr.
- Gjaldið fyri vaksin verður hækkað úr 30 kr. til 35 kr.
- Avsláttarkort til børn 25 ferðir hækkar úr 150 kr. til 250 kr., og kostnaðurin verður sostatt 10. kr. fyri hvørja ferð
- Avsláttarkort til vaksin 25 ferðir hækkar úr 540 kr. til 600 kr., og kostnaðurin verður sostatt 24 kr. fyri hvørja ferð.
- Avsláttarkort fyri vaksin 10 ferðir hækkar úr 220 til 300 kr., og kostnaðurin verður sostatt 30 kr. fyri hvørja ferð
- Avsláttarkort fyri pensjonistar hækkar úr 240 kr. til 300 kr., og kostnaðurin verður sostatt 12 kr. fyri hvørja ferð.

Metingar
Í sambandi við prístillagingar er viðkomandi at meta um sonevnda prístoygni (príselastisitetur). Tað snýr seg um í hvønn mun broyting í prísinum viðførir broyting í eftirspurninginum. Eitt fordømi er. Í 2009 vóru prísirnir hækkaðir. Broytingin tá hevði ikki ávirkan á talið á fólkum sum svimja.

Verður uppskotið sett í verk, rakar príshækkingin serliga tey, sum keypa eitt og eitt atgongumerki, tí prísurin fyri avsláttarkortini verður rættiliga lágur og fer neyvan at vera nøkur forðing fyri, at fólk fara at svimja í eins stóran mun sum í dag. Tískil verður mett, at í hesum føri er lágt prístoygni.

Hóast talan er um nakrar príshækkingar er framvegis lutfalsliga bíligt at svimja, serliga hjá teimum, sum

brúka avsláttarkort.

Mett verður at broytingarnar vilja geva nakrar hundraðtúsund kr. eyka í inntøkum.

Mælt verður til, at broytingarnar koma í gildi skjótast tað praktiskt ber til eftir samtykt í býráðnum. Avsláttarkort, ið keypt eru, áðrenn henda dato verða galdandi í tvey ár fram. Roknast kann við, at tað tí verða nakrir mánaðir áðrenn fullur virknaður av hesi broytingini slær ígjøgnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja nevndu broytingar í prísskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum, serliga ikki hækkingini hjá børnum og pensiónistum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turid Horn, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við mentamálanevndini og mælir býráðnum frá at samtykkja málið.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti**
Svimjihøllin hevur í mong ár havt eina serprísskrá fyri ymiskt feløg og stovnar.

Sí yvirlit:

| | | |
|---|---|---|
| 1. Glasir (Student og HF | Svimjing í dagtímunum, fastur prísur | 13.000 kr. árligt |
| 2. Námsvísindadeildin (Setrið) | Svimjing í dagtímunum, fastur prísur | 6.000. árligt |
| 3. Havnar Svimjifelag | Árligt leigugjald | 19.800 kr. árligt |
| 4. Føroya Triatlonfelag | Árligt leigugjald 1 tíma um vikuna | 4.500 kr. árligt |
| 5. Parasport Føroyar | Árligt leigugjald íroknað hitarúm/gos | 6.000 kr. árligt |
| 6. Føroya Froskmannafelag | Árligt leigugjald 1 ½ tíma um vikuna við hitarúmi og gos | 8.500 kr. árligt |

Á fundinum verður greitt frá vavinum á brúkinum hjá hesum brúkarabólkunum. Mælt verður til at leiðarin í Svimjihøllini fær formliga heimild at gera seravtalur við serligar brúkara bólkar. Størsti bólkurin er Havnar Svimjifelag.

Havnar Svimjifelag brúkar eisini svimjihylin í Eysturskúlanum og í Eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum uttan at rindað verður fyri tað. Mál um gjøld fyri leigu av hesum svimjihylunum, umframt brúk og leigu av svimjihylinum í Kollafirði kemur til komandi fund.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at heimila leiðaranum í Svimjihøllini at gera seravtalur við ávís feløg/stovnar og at hesar vera lagdar fyri mentamálanevndina til kunningar.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Svimjihøllin hevur verið í samráðingum og samskifti við viðkomandi partar, ið hava seravtalu og er komin til fylgjandi niðurstøðu:

Ikki er komið á mál við Havnar Svimjifelag enn, men eru samráðingar við felagið í gongd og ætlandi kemur ein niðurstøða til komandi fund. Felagið hevur týðandi skuld til TK (sí mál 16/01754 Skuldarmál innan grein 5).

Leiðari í Svimjihøllini skrivar:
---
Við støði í prísinum fyri keyp av korti til vaksin og børn, eri eg komin fram til hesi gjøld.

Kort vaksin: 600 / 25 = 24 kr.
Kort børn: 250 / 25 = 10 kr.

Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya

12 næmingar x 24 x 35 vikur = 10.080 kr. / avrundað 10.000 kr.

Froskmannafelagið
36 pers.(miðal) x 20 x 19 vikur = 13.680 kr / avrundað 13.500 kr.

Harumframt bjóðar felagið seg til at rudda fram við kai-kantinum í Vágsbotni á degnum ”Á grynnuni” og við Kongabrúnna á degnum “Rudda Føroyar”, umframt altjóða ruddingardagin fyri kavarar.

Parasport Føroyar

| | |
|---|---|
| 50 pers. (miðal) x 10 x 20 vikur = | 10.000 kr. |
| Baðstovurnar | 1.500 kr. |
| gosbað 120 x 3 x 20 = | 7.200 kr. |
| Í alt | 18.700 kr. |

Glasir

| | |
|---|---|
| 339 pers. (miðal) x 4 ferðir árliga x 24 = 32.544 kr. /avr. | 32.000 kr. |
| 59 pers. (miðal) x 2 ferðir árliga x 24 = 2.832 kr. /avr. | 2.800 kr |
| Í alt | 34.800 kr. |

| | |
|---|---|
| Triatlon óbroytt | 4.500 kr. |

| | |
|---|---|
| Samlað fyri leigur | 104.000 kr. |

Talan er um eina hækking svarandi til góðar 40.000 kr. í mun til árini frammanundan.

Tilfarið um tal og tíðir, er frá leigarunum.
---

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka kunninginum um gjald til eftirtektar og at umstingin kemur við endaligum tilmæli um Havnar Svimjifelag til komandi fund.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við nevndina í Havnar Svimjifelag um eina heildaravtalu um brúk av ymisku svimjihallunum og fyri at avklára skuldarstøðuna. Eisini hevur umsitingin fingið samlað yvirlit yvir venjingartíðir v.m. hjá felagnum og meting viðv. brúkinum. Felagið ynskir eisini at fáa víðkaða atgongd til 2 geilar á morgni.

Sí hjálagt uppskot til avtalu, ið umsitingin kemur at leggja fram við atliti til at lata endaliga kunning á komandi fundi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið til avtalu við Havnar Svimjifelag.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Leiðarin fyri Svimjihøllina í Gundadali hevur latið inn uppskot um dagføringar av verandi gjøldum fyri svimjing v.m.

Broyta vaksin úr 35 kr til 40 kr.
Broyta børn úr 15 kr. til 17,50 kr.

Talan er í høvuðsheitum um broytingar við støði í prís- og lønarvøkstri farnu 2 árini, ið tó er nakað hægri. Væntandi geva prísbroytingarnar eina meirinntøku á umleið 150 tkr. Við hesari broytingini verður eggjað til at føstu kundarnir velja at keypa avsláttarkort. Samstundis vil tað inniber at tey sum koma har sjáldan eitt nú ferðafólk rinda nakað meiri.

Broytta prísskráin verður ætlandi sett í gildi á sumri 2019.

**Tilmæli**
Trivnðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja broytingarnar í prísskránni. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í Mentamálanevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum hjá Mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Víst verður til viðgerðina av málinum 13. feb. 2019 um seravtalur við feløg.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við HS um eina heildaravtalu, ið fevnir um fleiri svimjihallir og herundir gjald. Harumframt fevnir semjan um uppskot um at HS fær tíðaravmarkaðan møguleika fyri styrkivenjingum í parti av verandi kaffistovuøki, ið samstundis verður umlagt nakað. Sí eisini mál 19/03573 – Svimjihøllin í Gundadali: Skipan av kaffistovu v.m. Í komandi langhylsverkætlanini er lagt upp fyri góðum umstøðum til styrkivenjingar o.a. til gagns fyri svimjiítróttina. Sí hjálagt uppskot til avtalu. Parturin um styrkivenjing er treytaður av neyðugum loyvum og verður framt innan raksturin hjá stovninum.

Avtaluviðurskiftini við HS hava verið ónøktandi í fleiri ár og við hesi avtalu er komið á mál við eini hampiligari semju fyri komandi kappingarár. Málið verður síðani tikið upp til víðari viðgerð í vetur.

Málið um faldna skuld hjá HS er ikki partur av hesum máli og verður tikið upp til komandi fund.

**Tilmæli**
Trivaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka avtaluna við Havnar Svimjifelag til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 09. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Í samband viðgerð í 2016 av skuld hjá Svimjisambandinum í máli 15/04273 Uppskot til skuldarsemju við Svimjisamband Føroya, var viðgjørt viðv. gjaldi framyvir fyri leigu av Svimjihøllini til kappingar burturav. Tá var avrátt at leigan pr. dag skuldi verið 5 tkr. framyvir. Svimjisambandið hevur 2-3 kappingar árliga og verður skuldskrivað við hesi upphædd. Tá var ikki greitt tikin støða til framtíðar gjald fyri kappingum hjá Havnar Svimjifelag, hetta tí so ógreitt skuldarviðurskifti hava verið í nógv ár. Felagið hevur upp til nakrar kappingar árliga. Felagið hevur samstarvavtalu um brúk av svimjihøllunum, men fevnir tað ikki um kappingarnar.

Avbjóðingin hjá Svimjihøllini er at tá kappingar eru koma ongar inntøkur og kann t.d. leygardag vera upp til 15-20 tkr. í inntøkum, ið høllin missir og verður tað meiri enn eitt vist er neyðugt at leggja upp fyri tí í fíggjarætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At gjaldið hjá Svimjisambandinum fyri leigu av svimjihøllini í Gundadali til kappingar er 5.000 kr./dagin.
b). At gjaldið hjá Havnar Svimjifelag fyri leigu av svimjihøllini í Gundadali til kappingar er 5.000 kr./dagin, tó ikki fyri fyrstu 3 dagarnar um árið.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Útsett.

**Mentamálanevndin 03. november 2021:** Útsett.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at sersambondini eiga at vera líkastillað í sambandi við kappingar. Somuleiðis er tað eisini óheppið at leggja eyka rokningar á Havnar Svimjifelag.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið av skrá.

## 9/22 Gundadalshøllin: Útbygging v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.01.2022 | 3/22 | 22/00017-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 6/22 | 22/00017-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 9/22 | 22/00017-1 |

**Upprunin til málið**
Ískoytisavtala frá 8. oktober 2021 í sambandi við avhendan av bygningi hjá L/F Venjingarhøllini (Gundadalshøllini) til Tórshavnar kommunu. (sí hjálagt skjal)
(TK-mál 17/01326).

**Lýsing av málinum**
Í ískoytisavtaluni er í § 2, stk. 2 ásett: "*TK hevur í hyggju komandi árini at útbyggja Gundadalshøllina fyri at økja um hallarkapasitetin í Gundadali*". Umframt at tað í § 3, stk. 3. er ásett: "*TK ger ábøtur á Gundadalshøllina, og arbeiðir fyri at fáa útvegað fundarhøli og styrkirúm til feløgini.*"

Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2022 er samtykt at játta 1.000 tkr. til Gundadalshøllina.

**Forkanningar**
Í sambandi við samráðingarnar um yvirtøku av Gundadalshøllini var gjørd støðulýsing av verandi høll. Sí hjálagt skjal frá 2017. Sum heild má metast at høllin tørvar rímiliga umfatandi umvælingar komandi árini.

Í sambandi við ætlan um at útbyggja er hugsanin at gera forkanningar viðv. ymiskum byggiloysnum, herundir loysnir við undanframleiddum bygningslutum, har kostnaðurin kann haldast niðri og at byggitíðin kann styttast, men annað verður eisini kannað. Lendið norðanfyri høllina er møguliga í ávísan mun byggibúgvið frá byggingini fyrst í áttatiárunum, tá ætlanirnir upprunaliga vóru um eina dupulthøll (verður kannað nærri).

Hugsanin er bæði at kanna viðv. bygging av høll afturat verandi høll, og eisini evt. loysn har bygd verður nýggj dupulthøll. Hetta fyri at fáa betri grundarlag fyri politiskari støðutakan um framtíðar loysnir, við bæði fíggingartørvi, rakstri-og viðlíkahaldi og funktión í huga.

Møgulig loysn verður eisini at taka hædd fyri ætlanunum um torg við Tórsvøll. Ætlanin er eisini innleiðandi at viðgera málið við byggimálsdeildina við atliti til hugsaðar loysnir, parkering v.m.

Henda fyrireikandi forkanningarfasan verður í høvuðsheitum at fremja innan umsitingina, men kunnu vera onkrar útreiðslur til ymiskar kanningar v.m. Skotið verður upp at seta 90 tkr. til endamálið. Ætlanin er at leggja málið fyri aftur í nevndini í seinni í ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Málið er higatil fyrireikað millum trivnaðarfyrisitingina/mentamáladeildina og teknisku fyrisiting/bygningsdeildina.

**Skjøl**
Støðulýsing frá 2017.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir forkanningar viðv. møguligum loysnum fyri eyka høll v.m. í Gundadali.
b). at flyta 90 tkr. av løgukontu 5775 ítróttaanlegg á nýggja projektkontu – L57040 Gundadalshøllin.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. januar 2022:** Samtykt at heimila umsitingini at fara undir forkanningar viðv. møguligum loysnum fyri eyka høll v.m. í Gundadali, og at flyta kr. 150.000 av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg LK57040 Gundadalshøllin á nýggja projektkontu L57040 Gundadalshøllin og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at høllin skal knýta í fjarhitaskipanina.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

# 10/22 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 25.06.2021 | 52/21 | 21/02652-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 16.09.2021 | 58/21 | 21/02652-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 26.10.2021 | 73/21 | 21/02652-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 83/21 | 21/02652-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 23.11.2021 | 87/21 | 21/02652-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 13.01.2022 | 4/22 | 21/02652-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 8/22 | 21/02652-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 10/22 | 21/02652-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í trivnaðarnevndini tann 6. mai í 2021

**Lýsing av málinum**
Á fundi í trivnaðarnevndini tann 6. mai 2021 varð samtykt at seta arbeiðsbólk samsvarandi fólkaskúlalógini at gera uppskot til skúlabygnað kommununnar. Samtykt varð eisini, at arbeiðssetningur, umboðan og tíðarætlan verður lagt fyri nevndina aftur (mál 21/00971).

**Arbeiðssetningur**
Sambært fólkaskúlalógini skal ein skúlabygnaður verða fyri fólkaskúlan í kommununi.

**§ 32.** [9)] Ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi, sbrt. § 47, stk. 6:

1) Navnið á tí einstaka skúlanum. Um so er, at kommunan hevur býtt sítt øki upp í skúlaumdømi, smb. § 29, so skulu nøvnini á umdømunum verða tilskilað. Her kann eisini vera ásett, at smærri umleggingar av umdømunum kunnu verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.
2) Vavið á tí einstaka skúlanum við atliti at undirvísing í grundskúla, 10. flokki o.ø. eftir § 4.

**§ 47** *Stk. 6.* [2)] Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.

**§ 57** *Stk. 5.* [9)] Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

Ein skúlabygnaður er í Tórshavnar kommunu, hann er tó ikki settur saman í eina heild, men er ein bygnaður fyri einstøku skúlarnar, og er góðkendur so hvørt broytingar hava verið, tað er t.d., tá nýggir skúlar eru bygdir, og tá skúlar eru lagdir saman.

Næmingarnir í Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Nólsoyar skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk. Uppskot hevur verið frammi um, at smáu skúlarnir hava árgangirnar til og við 6., og so flyta í størra skúlan, tá teir skulu í 7. flokk. 7. árgangur er í grundini partur av hádeildini, so tað er eitt nátúrligt skifti tá, haraftrat fáa næmingarnir nýggjar lærugreinir frá 7. flokki, og tær eru samfelagsfrøði, landalæra, lívfrøði

og alis- og evnafrøði. Samstarv er longu nú við Eysturskúlan, so næmingarnir í 7. árgangi í smáu skúlunum hava hesar ella nakrar av hesum lærugreinum í Eysturskúlanum.

Verður skúlabygnaðurin í smáu skúlunum broyttur soleiðis, at næmingarnir flyta, tá teir fara í 7. flokk, er møguligt at skipa forskúlalíknandi tilboð í skúlunum á sama hátt sum í Nólsoy, har forskúlalíknandi tilboðið er skipað í samstarvi millum dagstovn og skúla.

Næmingar í Sankta Frans skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 8. flokk. Skúlin á Fløtum er bygdur til fimm spor í 8. og 9. árgangi, trý úr Skúlanum á Fløtum og tvey úr Sankta Frans skúla.

Skúlin á Fløtum hevur skipað 8. og 9. flokk í rásir tvær ítróttarrásir og tríggjar almannarásir. Ítróttarásirnar eru ein fótbóltsrás og ein hondbóltsrás, og aðrir næmingar enn teir í Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla søkja inn á hesar rásir. Í ár var støðan so tann, at um ítróttarásirnar skuldu varðveitast, og allir næmingarnir í Sankta Frans skúla skuldu fáa pláss í skúlanum, varð neyðugt at søkja um loyvi at hava seks flokkar í 8. árgangi skúlaárið 2021/22. Frávik varð givið, men talan er um eitt undantak, og tað er bert galdandi fyri skúlaárið 2021/22.

Um næmingar í 8. og 9. flokki í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at velja breytir/rásir í øðrum skúla, enn skúlanum teir ganga í, er neyðugt at finna eina skipan, har næmingar hava møguleika at velja eftir áhuga. Tað er eisini umráðandi, at skúlarnir kenna næmingagrundarlagið, og at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur.

Uppskot til arbeiðssetning er:

A. at skriva verandi skúlabygnað saman í eina heild og at dagføra hann, soleiðis at greitt er, hvussu skúlabygnaðurin fyri hvønn einstakan skúla sær út.
B. at gera uppskot um, at næmingarnir í smáu skúlunum fara í 7. flokk í størri skúla, hvønn skúla teir fara í, og lýsa hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu.
C. at gera uppskot um, hvønn skúla ella skúlar næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í, tá teir fara í 8. flokk og lýsa hvørjar avleiðingar, tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin.
D. at gera uppskot um skipanina við 8. flokkunum og møguleikanum at velja, hvønn skúla teir fara í eftir 7. flokk.
E. at gera uppskot um skúlabygnað í hádeild, sum tryggjar, at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur, og at skúlarnir kenna næmingatalið í góðari tíð.

**<u>Umboðan</u>**

Sambært fólkaskúlalógini velur

§ 52 *Stk. 4.* [2] Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.

10 skúlastýri eru í Tórshavnar kommunu, og øll skulu vera umboðað í arbeiðsbólkinum, sum skal viðgera uppskot um skúlabygnað.

<u>Umsitingin mælir til, at hesi umboð mannað arbeiðsbólkin:</u>
Aðalbjørg Jógvansdóttir Linklett, forkvinna í skúlastýrinum í Nólsoyar skúla
Marianna á Dul Fríðberg, forkvinna í skúlastýrinum í Skúlanum á Argjahamri
Hallgrím Hansen, formaður í skúlastýrinum í Kollafjarðar skúla
Anna Rein, forkvinna í skúlastýrinum í Sankta Frans skúla
Leivur Simonsen, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Hoyvíkar skúla
Eydna Vitalis, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Skúlanum við Løgmannabreyt
Sóleyð Staksberg, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Velbastaðar skúla
Eyðna Magnussen, skrivari í skúlastýrinum í Eysturskúlanum
Fríðbjørg Hammer, skrivari í skúlastýrinum í Kaldbaks skúla
Regin Marnersson, skrivari í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum

**Tíðarætlan**
Eftir ætlan fer arbeiðsbólkurin til verka í august, og væntandi verða fýra fundir, so uppskot um skúlabygnað kann verða lagt fyri á fundi í trivnaðarnevndini tann 7. oktober 2021.

Trivnaðarnevndin fær ávegis kunning um arbeiðið, tá arbeiðsbólkurin hevur havt tveir fundir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja arbeiðssetning, umboðan í arbeiðsbólkinum og tíðarætlan.

**Trivnaðarnevndin 25. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um gongdina í arbeiðsbólkinum.

**Trivnaðarnevndin 16. september 2021:** Kunnað varð um gongdina.

Kristianna Winther Poulsen og Jákup Dam vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur havt 5 fundir, og tilmælini frá arbeiðsbólkinum eru hjáløgd, sí skjal 21/02652-14 Dagførdur skúlabygnaður, tilmæli oktober 2021.

Onnur hjáløgd skjøl eru: Svar frá umboðunum í arbeiðsbólkinum viðvíkjandi tilmælunum í "Dagførdur skúlabygnaður, tilmæli oktober 2021", fimm fundarfrágreiðingar og skriv frá skúlastjóranum í Sankta Frans skúla.

Arbeiðsbólkurin er ikki samdur. Hesi eru tilmælini:

**Arbeiðssetningur B -** *at gera uppskot um, at næmingarnir í smáu skúlunum fara í 7. flokk í størri skúla, hvønn skúla teir fara í og lýsa, hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu.*

Tilmæli:

**B 1** Næmingarnir í smáu skúlunum flyta í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk.

Skúlabygnaður í smáu skúlunum og Eysturskúlanum verður hesin:

Kaldbaks skúli 1. til og við 6. árgangur. (Skúlin fer eisini at søkja um forskúlaliknandi tilboð).

Velbastaðar skúli 1. til og við 6. árgangur.

Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 6. árgangur.

Eysturskúlin 2 spor í 1. til og við 6. árgangi og 3 spor í 7. til og við 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar

**B 2** Næmingarnir í Nólsoyar skúla halda fram í skúlanum til og við 7. flokki.

Skúlabygnaðurin fyri Nólsoyar skúla verður hesin:

Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 7. árgangi.

**B 3** Næmingarnir í smáu skúlunum flyta í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk, og so flyta næmingar úr Sankta Frans skúla ikki í Skúlan á Fløtum.

Skúlabygnaður í smáu skúlunum og Skúlanum á Fløtum verður hesin:

Kaldbaks skúli 1. til og við 6. árgangi. (Skúlin fer eisini at søkja um forskúlaliknandi tilboð).

Velbastaðar skúli 1. til og við 6. árgangi.
Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 6. árgangi.

Skúlin á Fløtum 3 spor 0. til og við 6. árgangi og 4 spor í 7. til og við 9. árgangi og 3 serflokkar ein til hvørja deild.

**Arbeiðssetningur C -** *at gera uppskot um, hvønn skúla ella skúlar næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í, tá teir fara í 8. flokk og lýsa hvørjar avleiðingar, tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin.*

**C 1** Næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Skúlan á Fløtum í 8. flokk.

Skúlabygnaður sum nú.

**C 2** Sankta Frans skúli fær 8. og 9. flokk.

Skúlabygnaður:

Sankta Frans skúli 2 spor frá forskúla til og við 9. árgangi.

Eysturskúlin 2 spor frá 1. til og við 6. árgangi og 3 spor (næmingarnir úr smáu skúlunum) í 7. til og við 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi, ella 3 sporaður frá 0. til og við 6. árgangi og 4 sporaður frá 7. til og við 9. árgangi., um næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**C 3** Næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í 8. flokk Eysturskúlan.

Sankta Frans skúli 2 spor frá forskúla til og við 9. árgangi.

Eysturskúlin 2 spor frá 1. til og við 7. árgangi og 5 spor í 8. og 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar. Ella 2 spor frá 1. til og við 6. árgangi og 3 spor í 7. um næmingar í smáu skúlunum fara í Eysturskúlan í 7. flokk., 5 spor í 8. og 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi ella 4 spor frá 7. til og við 9., um næmingarnir av Velbastað og møguliga hinum báðu smáu skúlunum fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**C 4** Sankta Frans skúli og Eysturskúlin verða lagdir saman, og nýggjur skúli bygdur til samanlagda skúlan.

Bygnaður fyri samanlagda skúlan:

4 spor í 0. til og við 6. árgangi, 4 ella 5 spor (smáu skúlarnir) í 7. til og við 9. árgangi og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi ella 4 spor frá 7. til og við 9. árgangi, um næmingarnir av Velbastað og møguliga hinum báðu smáu skúlunum fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**Arbeiðssetningur D -** *at gera uppskot um skipanina við 8. flokkunum og møguleikanum at velja, hvønn skúla teir fara í eftir 7. flokk.*

**D 1** Skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk skipa hádeildina innan fyri egnar karmar við teimum næmingum, sum ganga í skúlanum.

Skúlabygnaðurin broytist ikki, men næmingar hava ikki sama møguleika at velja rás sum nú. Skúlarnir kenna næmingagrundarlagið í góðari tíð.

**D 2** Skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk kunnu skipa rásir og tilboð, næmingar í øðrum skúla kunnu velja hesar rásir ella tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har.

Talan kundi eisini verið um tveir ella tríggjar av skúlunum í kommununi, sum bert høvdu hádeild, meðan hinir høvdu grund- og miðdeild.

**Arbeiðssetningur E** - *at gera uppskot um skúlabygnað í hádeild, sum tryggjar, at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur, og at skúlarnir kenna næmingatalið í góðari tíð*

Arbeiðssetningur C og E hanga eitt sindur saman, og tí er E partvís viðgjørdur undir C.

**Arbeiðssetningur A -** *at skriva verandi skúlabygnað saman í eina heild og at dagføra hann, soleiðis at greitt er, hvussu skúlabygnaðurin fyri hvønn einstakan skúla sær út.*

Við støði í tilmælunum frá arbeiðsbólkinum eru hesi trý uppskot um dagførdan skúlabygnað:

**Dagførdur skúlabygnaður 1**
Nólsoyar skúli
- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur (ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk (ella í 8. flokk)

Kaldbaks skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Velbastaðar skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Kollafjarðar skúli
- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri
- forskúli – 9. árgangur
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum
- forskúli – 6. árgangur, 3 spor
- 7. – 9. árgangur, 4 spor
- 3 serflokkar
- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli
- forskúli – 7. árgangur
- hevur 2 spor
- næmingarnir fara í Eysturskúlan í 8. fl.

Eysturskúlin
- 1. - 7. árgangur, 2 spor

- 8. – 9. árgang, 4 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar í ár

Hoyvíkar skúli

- 1- 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt

- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor)

**Dagførdur skúlabygnaður 2**
Nólsoyar skúli

- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur (ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Eysturskúlan í 7. flokk (ella í 8. flokk).

Kaldbaks skúli

- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Eysturskúlan í 7. flokk

Velbastaðar skúli

- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Eysturskúlan í 7. flokk

Kollafjarðar skúli

- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri

- forskúli – 9. árgangur
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum

- forskúli – 9. árgangur, 3 spor
- 3 serflokkar ein til hvørja deild, grund-, mið- og hádeild
- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli

- forskúli – 9. árgangur, næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum til høli eru tøk til 8. og 9. Flokk í Sankta Frans skúla

- hevur 2 spor

Eysturskúlin
- 1.- 7. árgangur, 2 spor
- 8. – 9. árgangur, 3 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar

Hoyvíkar skúli
- 1. - 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt
- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor)

**Dagførdur skúlabygnaður 3**
Nólsoyar skúli
- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur ( ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk (ella í 8. flokk)

Kaldbaks skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Velbastaðar skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Kollafjarðar skúli
- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri
- forskúli – 9. árgang
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum
- forskúli – 6. árgangur, 3 spor
- 7. – 9. árgangur, 4 spor
- 3 serflokkar ein til hvørja deild, grund-, mið- og hádeild

- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli og Eysturskúlin (samanlegging)
- forskúli – 9. árgangur, 4 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar

Hoyvíkar skúli
- 1. - 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt
- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor).

**Íverksetan:**
Skúlabygnað 1 ber til at seta í verk skúlaárið eftir, at góðkenning er frá landsstýrismanninum. So tað kundi verið frá skúlaárinum 2022/23.

Skúlabygnaður 2 kann vera galdandi frá skúlaárinum 2022/23, treytað av góðkenning frá landsstýrismanninum. Tó kann parturin við hádeild til Sankta Frans skúla ikki setast í verk fyrrenn høli eru tøk til 8. flokk og so árið eftir til 9. flokk eisini. Verður hesin skúlabygnaður settur í verk, er neyðugt at seta arbeiðsbólk at viðgera uppskotið, at Sankta Frans skúli fær 8. og 9. flokk og viðgera hølisloysn og kostnaðarmeting.

Skúlabygnaður 3 – partar av honum kunnu vera galdandi frá skúlaárinum 2022/23 treytað av góðkenning frá landsstýrismanninum. Tó er neyðugt at seta ein bólk við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at viðgera samanlegging av báðum skúlunum, hvussu mannagongdin skal vera, at skipa fyri samansjóðing av báðum skúlunum o.ø. samanleggingin kundi so verið frá skúlaárinum 2023/24.

**Víðari tilgongd:**
Bólkurin hevur tosað um samanlegging av Sankta Frans skúla og Eysturskúlanum. Um tað uppskotið skal fremjast, krevur tað longri tíð, og eigur at kannast nærri, og ætlan gerast fyri, hvussu ein møgulig samanlegging verður skipað. Bólkur umboðandi Sankta Frans skúla og Eysturskúlan eigur so at arbeiða við uppskotinum um samanlegging, sum so verður lagt fyri arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini at viðgera

Uppskotið at skipa hádeildina í Tórshavnar kommunu í ein til tríggjar ungdómsskúlar er eisini eitt størri stig, og um tað skal fremjast, eigur nýggjur arbeiðsbólkur at arbeiða við tí og síðani leggja uppskot fyri arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini at viðgera tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at
a) næmingarnir í smáu skúlunum fara í størra skúlan, tá teir fara í 7. flokk, næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, og næmingarnir í Nólsoyar skúla og Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan.

b) næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, og bólkur verður settur at viðgera eina møguliga samanlegging av Sankta Frans skúla og Eysturskúlanum, ella um Sankta Frans skúli skal hava 8. og 9. flokk ella halda fram sum nú, ein skúli við næmingum úr forskúla til og við 7. flokki, og næmingarnir fara so í Eysturskúlan í 8. flokk.

c) skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk kunnu skipa rásir og tilboð, næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innanfyri skúlabygnaðin.

**Trivnaðarnevndin 26. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) og c). Viðvíkjandi tilmæli c), so skulu skúlarnir, sum hava 8.-9. flokk, gera uppskot til leiðreglur um upptøku til rásir og tilboð í 8.-9. flokki, at leggja aftur fyri nevndina.

Harumframt samtykt, at arbeiðsbólkur verður settur við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at gera uppskot til skúlabygnað, harundir møguligt samstarv, um grunddeild, miðdeild, hádeild, serflokk o.a., at leggja aftur fyri nevndina til fund í mars 2022. Til niðurstøða fyriliggur, fara næmingarnir í Sankta Frans skúla í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk.

Málið verður beint í býráðið.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir málið á skrá við uppskoti um at broyta samtyktina omanfyri um arbeiðsbólk við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at gera uppskot til skúlabygnað, til í staðin at samtykkja, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2022/23 hevur hádeild, og at bygningurin í Kongagøtu verður partur av Sankta Frans skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Bjørg Dam, samtykti at broyta uppskotið til skúlabygnað soleiðis, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2022/23 hevur hádeild, og at bygningurin í Kongagøtu verður partur av Sankta Frans skúla.

Ein minniluti, Jákup Dam og Gunvør Balle, samtykti at halda fast í samtyktini 26. oktober 2021 um arbeiðsbólk.

Málið verður beint í býráðið.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir málið á skrá við uppskoti at broyta nevndarsamtyktina 15. november 2021.

**Trivnaðarnevndin 23. november 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir fram hetta uppskot:

- At næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk
- At næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk
- At næmingarnir í Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk
- At bygnaðurin fyri Skúlan á Fløtum verður broyttur soleiðis, at 8.-9. flokkur er fýra spor umframt serflokk (fevnir um 7.-9. floksstig)
- At skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk, kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar kunnu eisini samstarva um rásir og tilboð.
- At umsitingin kannar møguleikar fyri at skipa hádeild/framhaldsdeild í kommununi av nýggjum. Endamálið skal m.a. vera at geva næmingunum eitt fjølbroytt og mennandi skúlaumhvørvi og valmøguleikar viðvíkjandi lærugreinum, breytum o.ø., og at gagnnýta

høliskapasitet, læraratilfeingið o.a. tvørturum skúlar. Kanningin skal m.a. spyrja verandi og komandi næmingar í hádeild í ymsu skúlunum um teirra sjónarmið og ynskir. Kanningin skal eisini lýsa tørv og gera uppskot til eitt nú:

- Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla
- Samstarv millum skúlar um felags hádeild/framhaldsdeild
- Aðrar skúlaskipanir so sum ítróttaakademi, ungdómsskúli v.m.

**Trivnaðarnevndin 13. januar 2022:** Samtykt at broyta nevndarsamtyktina 15. november 2021 viðvíkjandi bygninginum í Kongagøtu og samtyktina 26. oktober 2021 viðvíkjandi Nólsoyar skúla. Hetta merkir, at næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, meðan møguleikin at skipa 8.-9. flokk í Sankta Frans skúla verður kannaður, og at Nólsoyar skúli framhaldandi hevur 1.-7. flokk.
Harumframt samtykt:

- At næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk
- At næmingarnir í Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk
- At bygnaðurin fyri Skúlan á Fløtum verður broyttur soleiðis, at 8.-9. flokkur er fýra spor umframt at rúm skal gerast fyri serflokki
- At skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk, kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar kunnu eisini samstarva um rásir og tilboð.
- At umsitingin kannar møguleikar fyri at skipa hádeild/framhaldsdeild í kommununi av nýggjum sbrt. uppskotinum omanfyri.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Umrøtt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið av skrá.

# 11/22 Forskúli í Eysturskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 15.12.2021 | 99/21 | 21/05093-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.12.2021 | 294/21 | 21/05093-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 9/22 | 21/05093-3 |
| 4 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 11/22 | 21/05093-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Eysturskúlanum at stovna forskúla

**Lýsing av málinum**
Fýra forskúlar eru í Tórshavnar kommunu. Teir eru í Sankta Frans skúla, í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum og í Lítlaskúla, sum er ein frískúli. Haraftrat er forskúlalíknandi tilboð í Nólsoy, tað er skipað í samstarvi millum dagstovn og skúla. Søkt er eisini um forskúlalíknandi tilboð í Kaldbak, sum ætlanin er at skipa á sama hátt, sum tað í Nólsoy.

Eysturskúlin hevur sent umsókn um at seta á stovn forskúla í Eysturskúlanum frá skúlaárinum 2022/23. Søkt verður um ein flokk, men grunddeildin í Eystuskúlanum er tvísporað, tí eigur forskúlin eisini at vera tvísporaður, soleiðis at øll tey 6 ára gomlu, í grunduppt økuøkinum hjá Eysturskúlanum, hava møguleika at fáa pláss í forskúla, um tey ynskja tað.

Í umsókníni stendur m.a.:" Endamálið við at at stovna forskúla í Eysturskúlanum er at bjóða eitt fullfíggjað og samanhangandi innskúlingartilboð frá tí ári, børnini eru 6 ára gomul, til tey eru liðug í 1. flokki. Til gagn og gleði fyri næmingar, foreldur og skúlan.

Skúlin, forskúlin og frítíðarskúlin í forskúla og 1. árgangi skulu í størri mun samvirka. Fyri barnið og foreldrini skal skúla- og frítíðarskúlatilboðið kennast sum eitt samanhangandi tilboð."

Innskriving
Innskrivingin í forskúla, 1. flokk og í frítíðarskúla skúlaárið 2022/23 er frá 15. desember 2021 til 16. januar 2022. Um forskúli verður í Eysturskúlanum næsta skúlaár, er møguleika at leingja freistina til t.d. 1.februar 2022 at skriva seg inn í forskúla har.

Lógargrundarlag
Sambært fólkaskúlalógini § 4, stk. 4 kann verða loyvt kommunum at seta forskúla á stovn.

**§ 10.** [1)] Í forskúlaflokki skulu børnini verða kunnað um dagliga lívið í skúlanum, læra at vera í skúla og at vera trygg við undirvísingarstøðuna, har tað fer fram eitt samspæl millum læring og leik.
*Stk. 2.* [1)] Børnini skulu læra grundstøðið undir lesing, skriving og rokning, læra at nýta bókasøvn, handaligt virksemi, tónleik, rørslu, at lurta og verða aktivur luttakari í undirvísingarstøðuni og í tí sosiala samverupartinum.
*Stk. 3.* [1)] Skipað samstarv skal verða millum lærarar og pedagogar í forskúla, byrjanarundirvísing og frítíðarskúla.

Sambært kunngerðini um skipan og læring í forskúla skal forskúlaflokkur hava tilknýti til ein fólkaskúla og skal húsast undir somu lon sum kommunali skúlin ella eftir serligari skipan við tilknýti til kommunala skúlan, og tað er skúlaleiðarin, sum hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum við tilvísing til kommununa, tá ið talan er um fíggjar- og hølisviðurskifti.

Innihald og skipan
Gerandisdagurin í forskúlanum verður skipaður í samstarvi millum pedagogar og lærarar. Virksemið í forskúlanum skal stuðla fjølbroyttu menningini og støðugu læritilgongdini hjá einstaka barninum. Leikur og læra eru ein týðandi partur í forskúlanum, og samspæl skal vera millum læring og leik.

Í umsóknin frá skúlanum stendur:" Innskúlingin skal fevna um menning á fleiri økjum, ið samsvara við kunngerðina um skipan og læring í forskúla, umframt námsætlan og stevnumið fyri frítíðarskúlar.

Hesi eru m.a.: Samvera og samstarv, málslig menning, listarlig menning, kropslig menning, rørsla og rútma, heilsa og rørsla, leikur og hugflog, siðir og mentan, náttúra og umhvørvi og persónlig og sosial menning.

Harumframt skal barnið menna sítt almenna medvit og sínar fakligu og handaligu førleikar gjøgnum skipað spæl og samveru."

Náttúra og umhvørvið verður týðandi partur av forskúlanum í Eysturskúlanum, og tí verður í minsta lagi ein útiskúladagur hvørja viku. Í umsóknini verður víst á, at Eysturskúlin liggur væl fyri í so máta við viðarlund, tjørn og fjøru nærindis.

Dentur verður lagdur á, at spæl er besta amboðið til læru í hesum aldursbólkinum, og tí er spæl týðandi partur av gerandisdegnum í forskúla og í frítíðarskúla, og í forskúlanum í Eysturskúlanum verður tilgongdin til læringina í so stóran mun sum gjørligt gjøgnum spæl.

Skipan av degnum
Børnini kunnu møta millum 07.30 og 08.15. og fara frítíðarskúla kl. 11.30.
Dagurin er skipaður við morgunløtu, leiki og læru, úti/inniløtu og verkstøðum, og síðani verður tikið saman um dagin, áðrenn starvsfólk í frítíðarskúlanum koma eftir børnunum. Ein dag um vikuna er so útiskúli, har dentur verður lagdur á náttúru og nærumhvørvi.

Karmarnir
Forskúlin fer at halda til í grunddeildini, stovurnar eru stórar og ljósar, men nakað av dagføring skal til. Góð atgongd er til spæliøkið, sum er í grøna økinum vestanfyri skúlan.

Verkligi, ítøkiligi og handaligi parturin fer at fylla nógv, so fakstovur til handaligu/kreativu lærugreinirnar verða eisini brúktar og eisini fimleikahøll.

Frítíðarskúlin
Børnini í Eysturskúlanum ganga í frítíðarskúla í Smílibýlinum. Har er ikki pláss fyri so nógvum børnum. Í løtuni eru tó árgangirnir í 1. og 2. flokki í Eysturskúlanum so mikið lítlir, at pláss er fyri øllum har. Men um forskúli kemur aftrat, er neyðugt at finna hølisloysn. Fyrbilshølini í skúlagarðinum í Eysturskúlanum eru eisini ætlað frítíðarskúlanum, men tað hevur verið hugsað sum høli, ið frítíðarskúlin brúkar til ávíst virksemi ella, tá tørvur er á at taka trýstið av, tí tað er so trongligt í Smílibýlinum. Tað kann vera ein avbjóðing at hava frítíðarskúlan á tveimum støðum, við verandi normering ber tað ikki til.

Arbeitt verður víðari við at finna hølisloysn til frítíðarskúlan, sum verður løgd fyri nevnd í vár.

Fígging
Foreldragjaldið í 2021 er 8.800,- kr. fyri forskúla og 12.450,- kr. fyri frítíðarskúla til forskúla, samanlagt er gjaldið tað sama sum fyri eitt barnagarðspláss.

Útreiðslurnar í 2021 fyri hvørt barn í forskúla eru 36.747.- kr., fyri hvørt barn frítíðarskúla til forskúla eru tær 33.000,- kr. tilsamans 69.747.- kr. útreiðslurnar fyri hvørt barn í barnagarði eru 55.000,- kr. Munurin er 14.747,- kr.

Játtan er ikki sett av til endamálið í í fíggjarætlanini fyri 2022. Uppskot er at fíggja forskúlan og frítíðarskúlan til forskúla við, at upphæddin pr. barn í barnagarði verður flutt Smílibýlinum og Eysturskúlanum, fyri tey børn, sum ikki halda fram í barnagarði, men velja at fara í forskúla og frítíðarskúla til forskúla. Endalig fígging kann verða løgd fyri nevnd aftur, tá innskrivingin er liðug, og talið á børnum, sum fara í forskúla í Eysturskúlanum er tøkt.

Mettar útreiðslur til dagføring av hølunum hjá forskúlanum og innbúgv til forskúlan eru 100 tkr. haraftrat

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla trivnaðarnevndini til:

a) at játta umsóknini og at senda Uttanríkis- og mentamálaráðnum umsókn um loyvi at seta á stovn forskúla í Eysturskúlanum
b) at málið verður lagt fyri aftur í vár við tilmæli um fíggjarliga partin
c) at tilmæli um hølisloysn til frítíðarskúla verður løgd fyri nevnd í vár.

og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini 15. desember 2021.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

## 12/22 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |
| 27 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 151/18 | 14/05065-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 265/18 | 14/05065-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 355/18 | 14/05065-1 |
| 30 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 319/18 | 14/05065-1 |
| 31 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 23/19 | 14/05065-1 |
| 32 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 44/19 | 14/05065-1 |
| 33 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 38/19 | 14/05065-1 |
| 34 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 178/19 | 14/05065-1 |
| 35 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 320/19 | 14/05065-1 |
| 36 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 307/19 | 14/05065-1 |
| 37 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 255/21 | 14/05065-1 |
| 38 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 1/22 | 14/05065-1 |
| 39 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 14/22 | 14/05065-1 |
| 40 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 12/22 | 14/05065-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. Til miðbýarætlan og kr. 2 mió. Til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. Til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. Settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr.   60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. Av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. Apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:
- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. Nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. Av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. November 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. Á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot – *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. Uttan mvg. At standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. Uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. Uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. Uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. Við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. Eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. Við mvg. Resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. Av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Eftir lisitatiónina hevur TG-Verk viðmerkt, at “tilboðið at gera býartorg í Steinatúni sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur er bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin, og TG Verk ikki hevur lovað at staðið við tilboðini”. Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum.

Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í kontakt við hægra tilboðsveitara, P/F Articon, sum hava váttað, at teir ikki megna at koma niður til prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum. Eftirfylgjandi hevur umsitingin verið í samráð við Sp/f Húsavarðartænastuna, P/F Nomatek og somuleiðis kannað møguleikar í Danmark, men eingin hevur verið áhugaður at gera hetta fyri prísin, sum varð komið ásamt um í sparirunduni við TG-Verk, og sum varð samtyktur í Býráðnum.

Umsitingin hevur bíðað eftir at bjóða verkætlanina út av nýggjum, tí tilboðini vórðu formelt annulleraði fríggjadagin 24.08.2018. Tískil skal mann smb. ABF06 bíða í 3 mánaðir frá hesum dato, áðrenn møguleiki er at bjóða hetta út av nýggjum, t.e. í fyrsta lagi 24.11.2018.

Fyri at fáa býartorgið í Steinatúni gjørt, so er ætlanin at bjóða somu verkætlan út enn einaferð í innbodna lisitatión til hesar arbeiðstakarar:

Sp/f Búsetur
Sp/f ÁTS
Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f Norðhús
P/F Articon
P/F MT/Højgaard

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera verkætlanina býartorg í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini, j.nr. 14/05065-77. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið á býartorg í Steinatúni út aftur eftir omanfyristandandi leisti, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Hálvtak á býartorginum Steinatún:**
Lisitatión var fyri verkætlanina Býartorg í Steinatúni tann 25. januar 2019. Bara ein arbeiðstakari møtti upp, og tað var Sp/f Húsavarðartænastan. Teirra tilboð var áljóðandi: 3.097.245,37 kr. Uttan mvg.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi 3.998.986,00 at gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt. Her er HVÙ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, o.a. íroknað.

2,4 mió. Eru longu játtaðar til verkætlanina Býartorg í Steinatúni. Sostatt manglar 1,6 mió. At gera verkætlanina Býartorg í Steinatúni liðugt.

**Dagføring av flísaálegging:**
Í sambandi við lokaðu verkætlanina at leggja flísar á torgið í Steinatúni, sum ikki vísir seg at vera nøktandi í mun til val av tilfari og onnur viðurskifti, er ynski lagt fram um at bøta um torgið og teir manglar, ið eru á staðnum. Talan er um brotnaðar flísar, ójavna yvirflatu, kantar millum torg og koyribreyt, trappu við ov lágum trapputrinum og vantandi gongulinjur til sjónveik.

Zeta Architects hava gjørt uppskot til eina uppstigan av torginum í Steinatúni, sum tekur atlit til leiðlinjur fyri sjónveik, atgongd fyri rørslutarnað, gliðtrygga yvirflatu, tunga ferðslu og stødd á flísum. Størri krøv eru somuleiðis sett til nýggjar flísar. Steinatún er ein liður í eini størri heild, og hava Zeta Architects somuleiðis gjørt uppskot við somu treytum til nýggja flísaálegging á gongugøtuni, frá Steinatúni og oman til Vaglið, sí uppskotið "Gongugøtan". Fyri at skapa eina betri og samanhangandi heildarmynd av miðbýnum tørvar gongugøtan somuleiðis eina uppstigan, og ber hon bráð av nógvum sløgum av flísum, brotnaðum flísum og einum sundurskildum býarrúmi.

Umsitingin mælir til at arbeiða víðari við uppskotinum "Gongugøtan", har neyðugar tillagingar verða gjørdar, umframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri ráðgeving, prosjektering og arbeiðstøku av uppskotinum.

**Skjøl:**
Gongugøtan, journal nr. 14/05065-83.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
1. At taka av tilboðnum fyri býartorgið, fara í sáttmálasamráðingar og undirskriva arbeiðstakarasáttmála við Sp/f Húsavarðartænastuna og játta írestandi pening áljóðandi 1 mió. Kr. Av konto 6275, L62034 Vágsbotnur – skipan av økinum og 600.000 kr. Av L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62029 Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýli og norðara síðan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
2. At umsitingin arbeiðir víðari við uppskotinum at uppstiga torgið, at játta kr. 200.000 til ráðgeving av konto 6275, L00001 Íløgukarmur fyri árið 2019 til L62027 Miðbýarætlan – Steinatún, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið í sambandi við verkætlanina L62027 Miðbýarætlan – Steinatún, sum fevndi um uppfylling og flísalegging eystarumegin vegøkið, gekk væl og var handað kommununi til ásetta tíð, tann 30. november 2016, við einum avlopi á kr. 42.805,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:
1. At loka verkætlanina L62027 Miðbýarætlan – Steinatún.
2. At avlopið á kr. 42.805,- verður flutt til løgukarmin L00001 á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur) 2019.
24. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ìskoyti:**
Verkætlanin Steinatún Býartorg hevur havt stórar avbjóðingar frá byrjan av. Verkætlanin er lítil í vavi, men sjálv konstruktiónin er óroynd og eindømi í Føroyum. Fyrsta avbjóðing var, at stálarbeiðið mátti broytast og tillagast. Frá byrjan varð prosjektið hugsað sum ein samlað konstruktión, sum kundi verið bygt á einum stað og síðani transporterað oman á Steinatún í einum. Skjótt blivu fortreytirnar broyttar, tí hetta ikki bar til m.a. orsakað av tilfarsvalinum á m.a. koparinum sum yvirflatu. Kopar tolir ikki væl at verða útsett undir transport. Onnur avbjóðing hevur verið viðv. Kopararbeiðinum, at undirarbeiðstakari hjá HVT hoppaði frá, tí viðkomandi metti hetta arbeiðið vera ov trupult at gera. Hesi átøk hava seinkað verkætlanini munandi.

Umsitingin hjá TK hevur varslað dagbøtur á verkætlanina mótvegis arbeiðstakaranum HVT. Í lýsingini av málinum hevur HVT akspeterað dagbøtur í fyrsta lagi. Avtalað varð eftirfylgjandi, at dagbøtur kundu gerast í eykaarbeiðunum á Steinatúni. Seinni boða HVT frá, at HVT ikki gongur avtaluni á møti at gjalda dagbøtur. Vísandi til ABF06 § 24, kunnu HVT ikki góðtaka dagbøtur, orsakað av tilfarsveitingum (stál), sum hevur tikið óvanliga langa tíð, mest grundað á broytingar, tillagingar v.m. Òsemjan snýr seg um eykaarbeiðini, sum eru gjørd á Steinatúni:

1 Upptøka av flísum, grevstur og burturkoyring
2 Planering
3 Hondverkarar at gera stoypiformar til plantukummu
4 Tilfar til stoypiformar
5 Reinsilag og klárgering til formar
6 Transport av formum og útgerð
7 Uppsetan av formum og armering
8 Stoypa plantukummu
9 Avforskalling
10 Fylt mold og tilfar plantukummu
11 Spagnum keypt mold (ovastu 20 cm)
12 Veitan av eyka flísum
13 Áleggjan og tilpassing av flísum
14 Tilfar til bonk
15 Bonkur
16 Byggiplássútreiðslur hegn avsperring og annað

17 Arbeiðsleiðari, avseting, uppmáting, prosjektgransking
18 Kunningarskermur
19 Niðurtøka av trappu
20 Niðurtøka av og burturflyting av náttarravnum
21 Brekkan av sokkli
22 Burturkoyring av tilfari og upprudding á staðnum
23 Ljósmastrar
24 Annað

Hesi eykaarbeiði eru øll liðugt gjørd á Steinatúni. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur samráðst við HVT um málið. Partarnir eru komnir ásamt um at gera eina semju áljóðandi 1.600.000,00 + mvg. Á hesi eykaarbeiði, svarandi til umleið 1.700.000,00 íroknað kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at:

- Flyta 1.520.000,00 av konto 6275, L62034, Vágsbotnur, skipan av økinum, á konto 6275, L62029, Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýlið og norðara síðan
  Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at fáa málið betur lýst til næsta fund.

**Ískoyti:**
Verkætlanin Steinatún Býartorg hevur havt stóran avbjóðingar frá byrjan av.

Verkætlanin er lítil í vavi, men sjálv konstruktiónin er óroynd og eindømi í Føroyum. Fyrsta avbjóðingin var, at stálarbeiðið mátti broytast og tillagast. Frá byrjan varð prosjektið hugsað sum ein samlað konstruktión, sum kundi verið bygt á einum stað og síðani transporterað oman á Steinatún í einum. Skjótt blivu fortreytirnar broyttar, tí hetta ikki bar til m.a. orsakað av tilfarsvalinum á m.a. koparinum sum yvirflatu. Kopar tolir ikki væl at vera útsett undir transport. Onnur avbjóðing hevur verið viðv. Kopararbeiðinum, at undirarbeiðstakari hjá HVT hoppaði frá, tí viðkomandi metti hetta arbeiðið vera ov trupult at gera. Somuleiðis var leveringin av stálinum sera drúgv, tá konstruktiónin ikki var roynd fyrr. Hesar avbjóðingar hava allar verið við til at seinka verkætlanini munandi.

Umsitingin hjá TK varslaði dagbøtur á verkætlanina mótvegis arbeiðstakaranum, og hevur HVT aksepterað dagbøtur pr. 3. apríl 2020. Avtalað varð millum kommununa og arbeiðstakaran eftirfylgjandi, at dagbøtur kundu innganga í ymiskum eykaarbeiðunum á Steinatúni.

Niðanfyri síggjast eykaarbeiðini, sum eru gjørd á Steinatúni:

- Niðurtøka og burturflyting av Náttarravnunum
- Nýggj plantukumma gjørd
- Planting í plantukummuni
- Flísaálegging kring plantukummuna
- Ljósmastrar
- Kunningarskermur
- El-arbeiðið
- Byggipláss, hegn, avsperring o.a.

Seinni boðar HVT frá, at HVT ikki gongur avtaluni á møti at gjalda dagbøtur. Teir grundaðu hesa niðurstøðu á §24 í ABF06, og grundaði HVT hesa niðurstøðuna við, at teir ikki kundu góðtaka dagbøtur, orsakað av tilfarsveitingum (stál), sum hevur tók óvanliga langa tíð, mest grundað á broytingar, tillagingar v.m.

Hendan niðurstøðan hjá HVT ger sostatt, at kommunan hevur fingið nakrar veitingar gjørdar, sum HVT seinni sendir rokning fyri, og sostatt uppstendur ein ósemja millum partarnar.

Samlaði kostnaðurin fyri eykaarbeiðini er áljóðandi kr. 1.988.162,00 uttan mvg., smb. HVT.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu metir at nakað av hesum kostnaðinum eigur at koma undir avtaluna um dagbøturnar, og hevur tí forhandlað við HVT um málið.

Partarnir eru nú komnir ásamt um at gera eina semju áljóðandi kr. 1.600.000,00 uttan mvg fyri eykaarbeiðini, svarandi til umleið 1.700.000,00 íroknað kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla til at:

- Flyta 1.620.000,00 av konto 6275, LK 62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, L62029, Miðbýarætlan Steinatún, Bussskýlið og norðara síðan
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

# 13/22 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 35/21 | 21/00676-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 158/21 | 21/00676-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 193/21 | 21/00676-7 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 4/22 | 21/00676-7 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 15/22 | 21/00676-7 |
| 6 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 13/22 | 21/00676-7 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá teknistovuni MAG, um at víðka um bygningin hjá Kemilux, niðan í móti vegnum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við omanfyri nevndu umsókn, hevur spurningurin stungið seg upp, um tað ikki er skilagott at dagføra verandi veg/vegir (tveir vegir lið um lið) soleiðis at bert ein vegur verður.

Í hesum sambandi hevur hevur kommunan umbiðið eitt uppskot og kostnaðarmeting frá sama ráðgevara um eina nýggja vegaloysn á nevnda staði.
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 4,1 mió. kr. u/mvg.

Kostnaðurin fyri at gera eitt prosjekt klárt til útboð er 300.000 kr. u/mvg., ella 320.000 v/mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til vegaloysn j.nr. 21/00676-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um at játta pening til projektering av omanfyri nevndu verkætlan, klárt til útbjóðing.

| | Býráðsfundur<br>27. januar 2022 | Blað nr.: 60<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato august-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At tikið verður av tilboðnum uppá projektering av verkætlanini
- At játtaðar verða kr. 320.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux"
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við tí ískoyti, at heimilað verður umsitingini at bjóða arbeiðið at gera verkætlanina út í innbodnari lisitatión. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión varð hildin 20.12.21, og komu 5 tilboð inn, har tað lægsta boðið var 5,73 mió. kr. uttan mvg.
Óvæntaðar útreiðslur eru mettar til 15%, svarandi til 900 tkr.
Samlaði fíggjartørvurin verður 6.63 mió. kr. uttan mvg. Íroknað kommunalt MVG verður talan um 7,1 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At játta kr. 7,1 mió. kr. av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á stovnsnummar 8175, L81044, Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux,
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at peningurin fyri søluna av lendi verður mótroknaður í játtanini.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

Elsa Berg boðaði frá, at hon var ógegni at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar.

## 14/22 Heildarætlan Eystara havnarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 57/17 | 17/03628-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 253/18 | 17/03628-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 63/21 | 17/03628-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 26/21 | 17/03628-1 |
| 5 Havnanevndin | 13.04.2021 | 18/21 | 17/03628-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 74/21 | 17/03628-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 108/21 | 17/03628-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 258/21 | 17/03628-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 17/03628-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | | | 17/03628-1 |
| 11 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 14/22 | 17/03628-1 |

**Upprunin til málið:**
Eystara havnarøkið verður víðkað, og tí er tørvur á gera eina ætlan fyri hvussu økið skal skipast.
Av tí at útbyggingin ikki verður liðug fyrr enn í 2019, er tørvur á at gera tillagingar á verandi øki beinanvegin. Serliga er tørvur á at gera tillagingar í verandi farstøð.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt til heildarætlan av Eystara havnarøki.
Uppskotið er ein lýsing av framtíðarætlanum fyri Eystara havnarøki, og lýsir verandi viðurskiftir, avbjóðingar og møguleikar.

Uppskotið lýsir verandi viðurskiftir, har undir ymiskleikan í ferðsluni, har stór skip, smábátar, størstu bilarnir og fólk til gongu eru á økinum. Hetta verður framhaldandi veruleiki, og kanska í enn størri mun enn í dag, nú havnarlagið verður víðkað.

Víðari lýsir uppskotið framtíðar menningarmøguleikar, støddir, volumenkanningar, nýggj ferðslumynstur og søgulig sambond, sum kunnu styrkjast millum Skansan, Tinganes og økið inn móti Kongabrúnni.
Til seinast lýsir uppskotið hvussu ferðsla, parkering og avgreiðsla av ferðafólki verður skipað tá útbyggingin av havnarlagnum verður liðug, soleiðis at tann vaksandi ferðingin og flutningurin, kann virka undir tryggum karmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er avlagt sum B1 havnarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
j.nr. 17/01436 Víðkan av Farstøðini

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Heildarætlan fyri Eystara havnarøki j.nr. 17/03628-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við heildarætlanini fyri Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og koyra heildarætlanina til almenna kunning og viðmerking.

**Ískoyti – kunna verður um málið.**
Uppskot til heildarætlan fyri Eystara havnarøki sampakkar bæði við Miðbýarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og við verandi ætlanir um at útbyggja Tórshavnar havn.

Í miðbýarætlanini eins og í heildarætlanini verður dentur m.a. lagdur á, at eitt øki við Eystaru bryggju verður lagt av til býartætting við eitt nú bústøðum, vinnu og virksemi tengt at býarlívinum.

Tankin aftanfyri útbyggingina av Tórshavnar havn er at fáa eitt væl skipað kaiøki, har bleyta vinnan er staðsett næst býnum og tunga og mest larmandi vinnan longst burtur frá býnum í tí nýggju útbyggingini. Hesum tanka fylgir heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki eisini.

Uppskotna heildarætlanin fevnir um trý øki, ið eru skipað í vinnulív, havnar- og ferðavinnuvirksemi og annað blandað virksemi.

Øki A er økið innast í Eystaru Vág og næst miðbýnum. Í heildarætlanini er hetta økið ætlað bleytum handils- og vinnuvirksemi. Her verður bleyta ferðslan leidd fram við bryggjukantinum, og søguligar frágreiðingar og rekreativt og býarkent virksemi verður borið fram, sum ein forlongdur armur frá økinum fram við Kongabrúnni, bátahylinum, Áarstovu og Essabar. Hetta sampakkar sera væl við uppskotið í miðbýarætlanini, har Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri eitt nú sjóvarítrótt og rekreatión. Harafturat verður lagt upp til, at Kongabrúgvin er eitt øki, har góðir møguleikar eru fyri býartætting, eitt nú við at byggja vinnubygningar og bústaðir og hetta sampakkar eisini væl við miðbýarætlanina.

Øki B er økið millum miðbýarvirksemi og havnarvirksemi. Uppskot til hetta øki er at skapa eitt náttúruligt skifti millum bý og bryggju, har ein seyrigøta kann leiða bleytu ferðsluna út úr býnum eftir bryggjukantinum, og eitt parkeringsøki kann skapa íbinding og avgreiðslu til havnina.

Øki C er økið tættast móti havnini og nýggju útbygginini. Hetta økið skal tola tunga ferðslu, og kunna virka sum granni hjá stóra havnarrúminum og samferðsluplássinum.

Við havnarútbyggingini, ið fer fram í løtuni, er týdningarmikið, at verandi og nýtt virksemi, knýtt at sjóvinnuni og bryggjukantinum, er væl skipað, og somuleiðis hugsað inn í eina langskygda heildarætlan. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum, og útbyggingin av Tórshavnar Havn eigur tí at vera hugsað saman við restini av økinum inn í eina heildarætlan, soleiðis at havnin kann gerast ein sameindur partur av restini av býnum.

Henda heildarætlan er ein menningarætlan, ið sameinar allar tættir í einum býarparti og stuðlar undir at ávegis avgerðir styðja uppundir langskygdar ætlanir. Hetta eru ætlanir, ið kommunan eigur at hava, bæði fyri at vera tilvitað, tá nýggjar ætlanir koma á tekniborðið og fyri at langtíðarætlanirnar verða havdar í huga, tá planlagt verður.

Heildarætlanin hevur í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, men kemur heildarætlanin at liggja til grund, tá býurin skal mennast víðari út eftir Havnargøtu/Kongabrúnni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini, undir hesum at kanna ferðsluviðurskiftini nærri og gera rúmkanningar av økinum, soleiðis at heildarætlanin verður greina út, fyri síðani at leggja málið fyri aftur nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn. Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
Mánadagin 8. mars 2021 var kunngjørt av Uttanríkis og mentamálaráðnum, at kappingin av staðsetingini av nýggja Tjóðleikhúsinum var avgreidd, og at dómsnevndin var komin fram til, at Tjóðleikhúsið skuldi staðsetast á Bursatanga, har leikhúsið kemur at standa á markamótinum millum bý og havn.

Tórshavnar kommuna fekk handa avgerðina frá Dómsnevndini og skal nú taka støðu til valdu staðseting. Í sambandi við at taka endaliga støðu til staðsetingina, so verður neyðugt at viðgera økið út frá teimum staðbundnu avbjóðingunum, sum økið hevur við sær, og verður neyðugt at tryggja sær, at endaliga staðsetingin hóskar inn til býarskipanarligu-, havna- og ferðsluatlitini, sum kommunan beinleiðis hevur til staðið.

Sostatt verður mett, at neyðugt verður at seta gongd á arbeiðið at skipa eystara havnaøkið í eina heildarætlan fyri økið, har staðsetingin av Tjóðleikhúsinum samstundis verður nágreinað.

Av tí at 5 ráðgevara-toymir eru knýtt at kappingini um Tjóðleikhúsið, og mugu hesi, samstundis sum tey tekna upp á eitt nýtt tjóðleikhús, taka støði til nærumhvørvið, so verður mett, at besta loysnin til at fáa eina nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og skipan av tjóðleikhúsinum er, at báðar kappingarnar verða samskipaðar.

Upplýst er fyri umsitingini, at hetta er sama tilgongd, sum Reykjavíkar kommuna framdi, tá Hørpan í Reykjavík og økið kring Hørpuna varð skipað.

Til at fara undir hesa tilgongd verður neyðugt, at býarskipanarligi, tekniski og havna myndugleikin nágreina ítøkiligu krøvini til eystara havnaøki nú og í framtíðini, soleiðis at ráðgevaratoymini hava nakað ítøkiligt at fyrihalda seg til, tá økið og bygningurin skal teknast.

Metta samlaða upphæddin at fíggja toymini er áljóðandi 500.000 kr., har hvørt toymið verður samsýnt við 100.000 kr.

Við at fara undir hesa tilgongd, so fær kommunan 5 ymisk uppskot til skipan av økinum, og kann hugsast, at elementir eru í øllum uppskotunum, sum kunnu gagna endaligu skipanini av økinum. Hetta er ein heldur óroynd tilgongd, og hevur kommunan ikki áður samskipa verkætlanir við landi á henda hátt, men mett verður, at týdningurin av at Tjóðleikhúsið verður staðsett í Tórshavn og týdningurin av at hendan staðseting er heldur serlig í mun til kringumstøðurnar, so er tað bara jaligt at fáa fleiri uppskot inn til skipan av økinum, soleiðis at kommunan í síðsta enda hevur eina skipan av økinum, sum tekur hædd fyri teimum staðbundnu viðurskiftum, sum kommunan metur vera av týdningi fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at farið verður undir at skipa eystara havnaøki sambært omanfyri standandi leisti,
- at umsitingin fer undir at nágreina ítøkiligu krøvini, sum ráðgevin skal fyrihalda seg til,
- at 500.000 kr. verða játtaðar av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið á nýggja íløgu ‘Skipan av eystara havnaøki’ undir konto 6275,
  og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot í málinum. Atkvøtt verður um soljóðandi uppskot: Samtykt við tí broyting, at fleiri arkitektar kunnu bjóða seg fram at gera heildarætlan. Málð um fígging verður at leggja fyri aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tørvur er á eini heildarætlan fyri Eystara havnaøki, frá Kongabrúnni og út undir Skansan, stóð tað 5 ráðgevarasamtøkum í boði at luttaka í eini “Hugskotsinnsavning”, sum Býarskipanardeildin skipaði fyri frá 20 okt. – 8.nov 2021.

Arbeiðið varð skipað so, at 5 ráðgevaratoymir skuldu arbeiða við hvør sínum uppskoti til eina heildarætlan hesar 7 vikurnar fyri eina samsýning á kr. 100.000 í part.
Tað vórðu 500.000 kr. settar av til hetta av konto 6275, fríðkan av Kommununi, og hetta varð samtykt á býráðsfundi longu 29. apríl 2021.

Býraðið samtykti tá eisini, broytingaruppskotið hjá Heðini Mortensen, at loyva fleiri ráðgevum at luttaka í hugskotsinnsavningini. Hetta var við støði í at tvær ráðgevarafyritøkur:

- EYA arkitektar og design
- Arkitektar 99

høvdu sýnt áhuga at vera við í verkætlanini saman við teimum upprunaligu 5 innbodnu ráðgevarasamtøkunum.
Hetta skuldi eisini samsýnast eftir sama leisti og við somu treytum. T.v.s. við 100.000 krónum í part fyri at gera uppskot til heildarætlan.
Báðar fyritøkurnar vórðu mettar at kunna innlata nøktandi talgilt tilfar.
Grundað á hesa samtykt vórðu tískil tilsamans 7 samtøk innkallað at luttaka í hugskotsinnsavningini, har tey fingu somu kravfesting og sama grundtilfar at arbeiða útfrá.

Tískil eru 2 fyritøkur afturat, sum hava rætt til at samsýnast við 100.000 í part fyri uppskotini, ið tey lótu inn. 8 nov. 2021.

Atlit skal harumframt takast til, at samsýningin fyri øll 7 innkomnu uppskotini má útgjaldast sum *samsýning fyri innkeypt ráðgevaraarbeiði*, og her má tískil íroknast meirvirðisgjald.

Afturat teimum framanundan játtaðu kr. 500.000, mugu tískil játtast kr. 243.750 afturat.
Tað er 100.000 í part til teir báðar innbodnu ráðgevarnar, umframt kommunala meirvirðisgjaldið (6,25%) av teirri samlaðu upphæddini at útgjalda til allar 7 ráðgevarnar.
Umframt tað er eisini nakað av fundarútreiðslum, sum fór til at skipa og leiga høli til verkstovu við viðgerðararbeiðinum. (Kr. 7.960 v.mvg)

Eina góða viku undan innlatingarfreistini kom fyrispurningur frá einum ráðgevi afturat (Albert Isfeldt og Jóannes Petersen) um at vera við í hugskotsinnsavningi. Ráðgevanum varð greitt frá, teir vóru vælkomnir at koma við einum sjálvbodnum ítkasti til eina heildarætlan, men at teir ikki kundu vænta samsýning fyri hetta arbeiði, tá teir ikki kundu lúka somu arbeiðstreytir sum hinum 7 ráðgevarnir arbeiddu undir, sum longu tá høvdu sitið við uppgávuni í 6 vikur. Hetta varð játtað, og ráðgevin lat eisini eitt uppskot inn, ið eisini varð tikið við í viðgerðartilgongdina.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. nov. 2021 hevur býarskipanardeildin verið í eini tilgongd, har arbeitt verður við innkomna tilfarinum fyri at fáa eina ítøkiliga og framtíðartryggjaða heildarætlan samansetta.
Umsitingin kemur at kunna um verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 255.000 av Løgukarminum LK62035 “Vetrarfriðing” á L62046, «Heildarætlan Eystara havnaøki», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

## 15/22 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 | 18/03468-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 26/21 | 18/03468-1 |
| 18 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 61/21 | 18/03468-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 99/21 | 18/03468-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 4/22 | 18/03468-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 16/22 | 18/03468-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 15/22 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:
- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin "skipan av Stórutjørn" er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vitandi um, at kommunan hevur tørv á størri byggilendi, er tað avgerandi fyri býarmenningina, at planleggingin av kommununi er framtíðartryggjað og í tráð við tær ætlanir og avbjóðingar, sum kommunan stendur upp ímóti.

Í vár varð arkitektakapping skipað um skipan av Stórutjørn, sum sambært Kommunuætlanini er fremst raðfest til býarvakstrarøki í kommununi. Tvær fyritøkur vunnu rættin at verða knýtt at prosjekteringsarbeiðinum sum ráðgevi at gera forprosjekt til fremstu raðfestingina av ætlanini.

Fyri at kunna fara inn á økið við teimum framtíðarætlanum, sum fyriliggja, er tað tí av stórum týdningi at endaliga skipanin av Stórutjørn verður raðfest.

Umsitingin ynskir at fara í samstarv við vinnandi fyritøkurnar fyri at nágreina skipanina av økinum, og gera raðfestingar, soleiðis at farast kann undir partar av útstykkingini.

Stóratjørn er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin verður neyðugt at fara í samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum.
Kappingin fevndi um økið matr. nr. 135ed og matr. nr. 1æf. Víddin á matriklunum er:

- matr. 135ed er 108175 $m^2$ til støddar (kortvídd)
- matr. 1æf er 117.184 $m^2$ til støddar (kortvídd)

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at yvirtaka í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin kann gerast veruleiki í stigum.

Somuleiðis er at upplýsa, at arbeitt verður við avtaluni millum Landsverk og kommununa um innkomuvegin, sum endaliga kemur at hava stóra ávirkan á virkið í Stórutjørn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at játta 2 mió. kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur), L62039, Stóratjørn til framhaldandi skipan av økinum.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið skal viðgerast tvær ferðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at broyta játtan 2 mió. kr. til ikki at taka av konto 6475 men av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímót og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina samskift við teir báðar vinnararnar av kappingini um ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn, sí viðhefta uppskot til ráðgevarasáttmála *Stóratjørn__Ráðgevarasátmáli_FYRIBILS_2021.12.07*. Smb. sáttmálanum skulu ráðgevarnir gera eina yvirskipaða heildarætlan fyri økið, ið skal lýsa fortreytirnar fyri bygging, eitt uppbýti av økjum sum tilsamans skapar ein fjøltáttaðan býarpart. Ætlanin skal vísa eina skipan ella staðseting av vegaføring, parkering, bussleið, bústaðar-, stovns-, vinnu- og ítróttarbýlingum.

Harumframt eru frágreiðingar viðv. hugsjón og virðum, fortreytum, burðardygd, økisbýti, náttúru, tilhaldi, býlingum, vegakervi, gøtukervi, høvuðsleiðingum, endurnýtslu og byggibúning.

Sambært tíðarætlanini tekur arbeiðið at gera heildarætlanina tríggjar mánaðir og ráðgevingin kostar 2.000.000,- kr. u.mvg.

Á býráðsfundinum 25. mars 2021 varð samtykt at játta 2.000.000,- kr. til framhaldandi skipanina av økinum. Av hesum eru 1.970.000,- kr. eftir. Soleiðis íresta 530.000,- kr. til ráðgevarnar, umframt 100.000,- kr. til aðrar útreiðslur í smb. við gerð av heildarætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At taka undir við uppskotinum til ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn.
- At játta 630.000,- kr. av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn, til samsýning til ráðgevarnar.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at játta kr 330.000 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn. Nevndin ynskir, at hædd verður tikin til veðurviðuskiftini og handilsviðurskiftini í tilgongdini, umframt at nevndin ynskir at verða kunnað leypandi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Elsu Berg, at náttúruviðurskifti verður lagt afturat orðingini hjá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt**.**

# 16/22 Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 255/20 | 20/03466-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 327/20 | 20/03466-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 328/20 | 20/03466-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 299/20 | 20/03466-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 251/21 | 20/03466-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 03.11.2021 | 255/21 | 20/03466-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 16/22 | 20/03466-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Leiðarin á Tórshavnar býarsavni hevur saman við umsitingini arbeitt við at lýsa tríggjar ymiskar valmøguleikar fyri umvæling og umbygging av bygninginum á Frúutrøð 1 til framtíðar savnsvirksemi, herundir fevna um fasta framsýning, skiftandi framsýningar og umsiting og lutvíst goymsla. Sí hjálagt upprit.

Til fundin kemur umsitingin at greiða nærri frá uppritinum.

Næsta stig vildi verið at fingið gjørt nærri metingar um kostna fyri eitt ella fleiri av stigunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið um framtíðar íbúðarbygging á Frúutrøð.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Sí hjáløgdu frágreiðing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, býararktitekturin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal halda fram við fyrireikingunum við støði í stig 1, 2 ella 3.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við at arbeitt verður við stig 1, løtt loysn.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Játtan
Á fundi í mentamálanevndini 5. oktober 2020 var samtykt at arbeiða víðari við stig 1 sbrt. hjálagda uppriti.

Í fíggjarætlanini fyri 2021 hevur býráðið 26. november 2020 samtykt at játta 1.500 tkr. sum løgujáttan til Tórshavnar býarsavn.

Fyrireikingar og útinning
Tískil eru nú grundarlag fyri at fara undir fyrireikingar og seinni útinning av stig 1, løtt loysn, har dentur verður lagdur á at fáa betrað munandi um fyritreytirnar fyri at hava eina fasta framsýning og møguligar evnisframsýningar og har tað samstundis verður roynt at fáa funktiónina í bygninginum so góða sum tilber innanfyri givna fíggjarkarmin m.a. við at gera brunatiltøk, ið gera tað møguligt at fáa nýtsluloyvi til at hava væl fleiri fólk inni í senn og soleiðis økja um nyttuvirði og eisini inntøkurnar.

Neyðugar tillagingar v.m.
Lætta loysnin inniber at framsýningarrúm vera tillagaði, at ávísir veggir vera tiknir niður/fluttir og aðrir skilaveggir gjørdir fyri at fáa meiri framsýningarpláss, umframt aðrar neyðugar funktiónir.

Aðrar ábøtur sum avleiðing av tillagingunum, er at skifta gólv, umframt mála veggir og loft, umframt at betra um vesi-viðurskiftini sbrt. galdandi byggikunngerð. Eisini vera tiltøk gjørd fyri at fáa ljósviðurskiftini betri egnaði til framsýningarvirksemi, umframt aðrar smærri tillagingar, alt eftir sum tøka fíggingin nú røkkur til.

Fyri at fáa sum mest burturúr tøku játtanini er hugsanin at fáa ráðgeva at gera grundleggjandi kanningar og projektering og síðani at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvær fyritøkur. Ætlandi kunnu

fyrireikingarnar byrja í næstum og síðani heinta inn tilboð í januar 2021 og fara undir útinning í januar/feb. 2021. Væntandi tekur arbeiðið umleið 3-4 mánaðir og kann so væntandi vera klárt til at ein føst framsýning kann lata upp á sumri 2021. Verkætlanin verður tillagað alt eftir hvussu útboðið hildnast.

Verkætlanarbólkur
Innanhýsis í kommununi kemur verkætlanin at vera eitt samstarv millum Tórshavnar býarsavn, býarskipanardeildina, trivnaðarfyrisitingina/mentamáladeildina og húsaumsitingina. Húsaumsitingin kemur at hava verkætlanarleiðsluna um hendi og vera byggiharri.

Møgulig framtíðar stig
So vítt tilber, vil tað í hesi verkætlanini vera tikin atlit til at henda verkætlanin tekur hædd fyri møguligum seinni framhaldi til stig 2 og 3 í uppritinum um hølisviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Húsaumsitingini, býararkitekturin og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at játta 1.500 tkr. av løgujáttan (2021) - 5575 Søvn og mentanararvur til nýggja projektkontu - Tórshavnar býarsavn.

b). at heimila umsitingini at fáa projekterað umbygging og umvælingar av bygninginum á Frúutrøð 1 og at søkja um byggiloyvi.

c). at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð antin sum høvuðsarbeiðstøku ella sum fakarbeiðstøkur og innganga sáttmálar innan tøka fíggjarkarmin.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt, vegna vantandi heildarætlan og kostnaðarætlan.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Annika Olsen, býráðslimur ynskir at fáa málið á skrá, umframt at leiðarin fyri Tórshavnar býarsavn skal koma á fundin og greiða frá støðuni.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Umrøtt. Málið verður tikið upp aftur á næsta fundi.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Síðani samtyktina í fjør hevur umsitingin fingið nágreinað nærri viðurskiftini kring eina umbygging av bygninginum á Frúutrøð 1. Ein verkætlan, ið tekur hædd fyri øllum neyðugum krøvum sbrt. BK17 byggikunngerðini, umframt tørv og funktión hjá Býarsavninum sbrt. upplegginum 'løtt loysn', ið var viðgjørd í fjør, og sum var grundarlagið undir samtyktini í býráðnum 17. desember 2020.
Umsitingin greiðir á fundinum nærri frá kostnaðarmeting v.m. Støðan er at verandi fígging ikki røkkur til ætlanina, men er talan um ca. tvífalda upphædd.

**Fundur í savnsnevndini**
Víst verður til viðgerð á seinasta fundi. Sbrt. grein 2, stk. 2, 1. pettið í viðtøkunum fyri Tórshavnar býarsavn er mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs er savnsnevnd hjá Tórshavnar býarsavni og hevur ábyrgd av rakstrinum. Sí hjálagt viðtøkurnar.

Á fundinum kemur leiðarin fyri Tórshavnar býarsavn at greiða frá virkseminum og ætlaðu umbyggingini og viðurskifti í hesum sambandi og at viðgera tað saman við nevndini. Sí hjálagt ársfrágreiðing 2020 og virksemisætlanina fyri 2021.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at viðgera um farast skal víðari við fyrireikingunum at umvæla savnsbygningin á Frúutrøð 1 og útvega neyðuga fígging.
b). sum savnsnevnd at viðgera virksemi hjá Tórshavnar býarsavni nú og framyvir.

**Mentamálanevndin 03. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Annfinni Brekksteini at beina málið aftur í Mentamálanevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 blonkum og ongari fyri.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Birita B. Iversen, Annika Olsen, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

# 17/22 Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.11.2021 | 228/21 | 21/04713-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 311/21 | 21/04713-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 17/22 | 21/04713-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin ivi er um, at við einum fjølbroyttum bústaðarmarknað kann kommunan virka fyri eini fjøltáttaðari fólkasamanseting. Týdningarmikið er, at fjølbroytni vísir seg innan bústaðarsløg men eisini innan eigaraviðurskifti. Í bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu er tað blivið lagt út í korti at náa einari samanseting av bústaðarsløgum áljóðandi 60% sethús, 20% íbúðir og 20% rað- og tvíhús innan 2030.
9 ár áðrenn framrokningina kunnu vit staðfesta, at vit meiri ella minni hava nátt hesum málinum við 59% sethúsum, 27% íbúðir og 14% rað- og tvíhús. Hetta vísir, at tað er sera ringt, sum kommuna, at planleggja hvussu tann veruligi bústaðarmarknaðurin kemur at síggja út. Tó kann kommunan gera sítt fyri at stýra planeggingini ávísar vegir, t.d. við at útleggja tey kommunalu grundstykkini til ávís endamál.

Í bústaðarpolitikkinum verður eisini víst á ein ójavnvág innan eigaraviðurskifti á bústøðum í kommununi. Í 2018 var tað einans 1% av tí samlaða bústaðarmarknaðinum, ið vóru bústaðir til leigu (her er einans tann skipaði leigumarknaðurin taldur við). Í dag sær myndin eitt sindur frægari út, fleiri leigubústaðir eru komnir til og prátið um lutaíbúðir er veruliga við at gera sína innrás.

Kanningar eru ikki gjørdar av tørvinum fyri lutaíbúðir, men umsitingin veit frá arbeiðinum við bústaðarpolitikkinum, og við útbjóðing av leigubústøðum (á Frúurøð og Undir kongavarða), at áhugi og tørvur er á lutaíbúðum.

Føroyar hevur fáar lutaíbúðir og harvið fáar royndir. Í Havn er eitt lutaíbúðafelag, ið er stovnað langt áðrenn lógin varð sett í gildi.
Bústaðir hevur fleiri ferðir tikið stig til at byggja lutaíbúðir í Tórshavn, men av ymiskum grundum er tað ikki blivið til nakað. Fyri tveimum árum síðan eydnaðist tað at byggja 8 lutaíbúðir Á Kneysum á Toftum. Hetta er á ein hátt ein søgulig hending, tí Lutaíbúðarfelagið Á Kneysum er fyrsta felagið, ið er stovnað sambært løgtingslógini um lutaíbúðarfeløg.

Í Vági er kommunan næstan liðug við byggingina av eini lutaíbúðarverkætlan. Enn hevur Vága kommuna ikki greitt frá, hvussu tað verður fíggjað ella hvør stendur fyri tí. Vit vita tó, at Bústaðir er partur av verkætlanini.

Í eini samrøðu við Pensjónsfelagið Lív, hava tey víst áhuga og eru ikki avvísandi fyri at fara inn í eina lutaíbúðarverkætlan. Tey vilja tó hoyra meira um, hvat kommunan ætlar, og síggja ítøkiligar leistir.

Leisturin, ið Bústaðir nýtir, er at Bústaðir mennir verkætlanina saman við arbeiðstakara og ráðgeva og selur lutaíbúðirnar til lutaíbúðarfelagið, tá alt er liðugt. Hetta hevur teir fyrimunir við sær, at Bústaðir kann fíggja í byggitíðarskeiðnum og taka byggiváðan uppá seg, so lutakeyparar vita, hvat teir fáa og til hvønn kostnað.

Ætlanin er í fyrsta umfari, at kommunan einans bjóðar øki út til bygging av lutaíbúðum og letur feløgini sjálvi skipa seg. Ynski er ikki, at kommunan luttekur í byggingini. Mett verður ikki, at tørvur er á at kommunan er við, hetta serliga grundað á stóra bústaðartørvin.

Í 2018 og 2019 fór Tórshavnar kommuna undir at bjóða út lendi til bygging av leigubústøðum í kommununi og tá vísti tað seg, at størsta avbjóðingin var fígging. Áhugavert verður at síggja um sama er galdandi innan bygging av lutaíbúðum, men verður mett, at tað er vert at geva tí eina roynd.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða tríggjar matriklar út til bygging av lutaíbúðum.
Talan er um matr. nr. 1355 og 1356 sí *kortskjal 1355 og 1356* við Villingadalsvegin, og part av matr. 645a, ið er øki á Frúutrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

**Matrikul 1355 og 1356**
Matriklarnar 1355 og 1356 liggja báðir vestan fyri Villingadalsvegin. Atkoman til stykkini skal samskipast í mun til linjuføringina av framtíðar innkomuvegi.

Innkomuvegurin kemur at ganga partvís ígjøgnum matr. nr. 1355. Tryggjast skal, at byggingin hevur eina nøktandi frástøðu frá innkomuvegnum umframt at vegurin verður hugsaður inn í byggiverkætlanina, sum ein integreraður partur, ið ikki niðursetur trivnaðin í økinum.

Matriklarnir liggja í forleingilsi av einum hamara, sum ger at vatn frá hamaranum verður uppfangað í lendinum og ger lendið sera vátt. Tí skal regnvatnsuppsamling/-seinking somuleiðis blíva ein partur av einari møguligari byggiverkætlan, soleiðis at vatnið framhaldandi kann seyra vekk.

Hamarin gongur sum ein rond allan vegin suður-/vestureftir oman framvið Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga hevði tað verið upplagt at nýtt tøku matriklarnar framvið hamarinum til hægri bygging. Bæði tí at teir ikki taka útsýnið frá nøkrum, bygningarnir kunnu fáa útsýni yvir allan býin umframt at hamarin skapar lívd frá vesturættini.

Sum nú er liggja matriklarnir í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sum áður sagt, vildi tað verið upplagt at broytt byggisamtyktina fyri eitt størri øki suðureftir framvið hamaranum, við tí fyri eyga at gera ein rond av hægri bygging fram við øllum hamarum. Mest skynsamt er tí at broyta almennu byggisamtyktina til økisáseting A2, sum er ætlað høgari bústaðabygging. Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*§6, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva*.

**Matrikul 645a**
Næsta økið, ið talan er um, er partur av matrikul 645a á Frúurtrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

Matrikulin fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð. Neyðugt verður at skipa matrikuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út.

Virksemi er á økinum í løtuni. Í gamla læknabygningi eru eindarleiðarar fyri kommununa og Hondbóltssamband Føroya og í gamla musikkskúla húsast Tórshavnar Býarsavn. Fyri einum ári síðan bleiv tað samtykt, at Tórshavnar Býarsavn skuldi flyta permanent inn í gamla musikkskúlan. Støða skal tí takast til, um lendið skal bjóðast tú við verandi bygningum og virksemi.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Verandi kloakkskipan er gomul og krevur ábøtur umframt at hon ikki er útgjørd til fleiri húsarhald. Ein skynsamur fíggingar háttur er at dagføringin av kloakkskipanini kann blíva fíggjað av søluni av lendinum.

Talan verður um eina býartætting og gagnnýtslu av verandi infrakervi, sum vit sambært Bústaðarpolitikkinum eisini leggja upp til at gera meiri av.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at tá tosað verður um býartætting, kann ein av avleiðingum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram. Um tað ikki verður gjørligt at

nøkta parkeringstørvin við teimum verandi 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til lutaíbúðirnar, verður tað uppgáva hjá kommununi at varðveita/skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.
Býarskipanarliga hevði økið havt gott av at blivið skipað sum ein partur av eini størri heild. Lendi inni í býnum eru sera avmarkað og kostnaðarmikil. Kommunan eigur sjálv avmarkað lendi í verandi býi, men hesi eru ikki samanhangandi og liggja oftani upp at privatum lendi. Fyri at skapa ein burðardyggan tættleika í býnum, har leiðingar, undirstøðukervi, gerandis hentleikar o.a. longu eru á staðnum eigur at verða lagt upp til at tilboðsgevari inndregur aðrar matriklar í grannalagnum sum ein part av tí samlaðu verkætlanini.

Økið er áður blivið bjóðað út til bygging av bústøðum men hendan ætlanin bleiv slept aftur. Íleggjarar og vinnan vóru sera áhugaðir í økinum, men tá alt kom til alt bjóðaði eingin. Høvuðsorsøkin til hetta var, at tað blivu settar somikið nógvar treytir til byggingina, at verkætlanin nærum bleiv ógjørlig og ov viðkvom.
Økið liggur í einum frammanundan skipaðum øki við nógvari søgu. Tað hevur við sær at borgarar í býnum hava nógvar meiningar um økið og føla somuleiðis eina eigarakenslu til økið. Tí er týdningarmikið, at kommunan er sera neyv í mun til tær treytirnar ið verða settar til byggingina og allan vegin gjøgnum tilgongdina tekur borgarar við, bæði í mun til kunning og luttøku.

Ætlanin er at bjóða matr. 1355, 1356 og 645a út alment og øll, sum lúka ávísar treytir, kunnu koma við eini boðið, eini frágreiðing og einum skitsuuppskoti, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá lendini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá teknisku deild:

Kanningararbeiði skal gerast í mun til eina hóskandi atkomuloysn til matr. nr. 1355 og 1356. Framyvir verður mælt til at verkætlanir verða tillagaðar linjuføringina av innkomuvegnum.

**Skjøl**
21/04713-2 1355-1356
21/04713-2 645a

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara í holt við fyrireikandi kanningararbeiði, ið skal til fyri at kunna gera útbjóðingartilfar, fyri síðan at bjóða omanfyri nevndu matriklar út til bygging av lutaíbúðum, umframt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at onnur staðseting verður funnin til býarsavnið.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking, at onnur staðseting skal finnast til øll, ið virka í økinum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Birita B. Iversen, Annika Olsen, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

# 18/22 Argja kirkja : Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum - matr. nr. 56a og 115, Argir - broyting av byggisamtyktini (2006-0769)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 18/22 | 22/00358-80 |

**Upprunin til málið**
**2006-0769/49 SG**
**Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Kirkjuráðið á Argjum er komið við fyrispurningi um møguleikarnar at byggja uppí verandi kirkju ella at fáa annað stað at byggja nýggja kirkju á. Eitt uppskot er, at byggja kirkju á sokallaðu "Cepa trøðna".

Skjøl:
Umsókn j. nr. 2006-0769/1.
Tekningar j. nr. 2006-0769/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, byggi- og býarskipanarnevndin heitir á byggi- og býarskipanardeildina um at ávísa egnaði støð til nýggja kirkju á Argjum, herundir at meta um hvørt útbygging av verandi kirkju er ein møgulig loysn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. august 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
-Í sambandi við fyrispurning frá kirkjuráðnum á Argjum um framtíðar møguleikar fyri kirkjuna á Argjum, hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til staðseting av nýggjari kirkju á Argjum.

Økið, ið liggur ímillum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið, er uml. 4.000 m2 til støddar og er partar av matr nr. 115 og 56a. Sí hjálagda kort dagf. 08.01.08.

Sambært almennu byggisamtyktini liggur økið í umráðispartinum D1, ið er lagdur til *almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tilíkt*.

Mentunarlig endamál kann t.d. vera ein kirkja. Vesturkirkjan liggur í einum D1 øki.

Av tí at økið liggur oman ímóti Sandá, er neyðugt at søkja friðingarmyndugleikarnar um undantaksloyvi frá Náttúruverndarlógini §2, sum sigur, at tað ikki eigur at verða bygt nærri áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum, uttan loyvi frá friðingarmyndug-leikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, nevndin góðkennir økið til nýggja kirkju á Argjum sambært kortskjali dagf. 08.01.08. og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við málinum. Harumframt skal Friðingarnevndin hoyrast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka
undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti 21. august 2008:**
Loyvi er nú givið av friðingarmyndugleikunum til at kirkjan kann leggjast á

øki millum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið soleiðis sum skotið upp av býarskipanardeildini og góðkent av Byggi- og býarskipanarnevndini tann 14. januar 2008.

Neyðugt er nú at taka støðu til, hvønn prís lendi skal seljast fyri.

Upplýsast kann, at Hoyvíkar kirkja og Samkoman Lívdin hava keypt grundstykkir frá Tórshavnar kommunu fyri kr. 156,00 fermeturin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at kommunan í sambandi við eina møguliga sølu av lendinum, fær ávirkan á endaliga útsjónd og staðseting av kirkjuni.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja kirkjuráðnum á Argjum áleið 4000 fermetrar av økinum millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sambært forskjalið 2006-0769, dagfest 1. august 2008, fyri kr. 156,- fermeturin.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 m2 av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at økið liggur í D1-øki *(almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt)*, ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at frábýta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Hendan avgerðin hjá Umhvørvisstovuni bleiv um ársskiftið 2008/2009 kærd til Kærunevndina í lendismálum.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum til seinast í oktober í 2009 tá skriv kom frá Føroya kærustovni um at nevndin hevði staðfest avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Í galdandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sær kap. IV, §22 soleiðis út:

**“§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

3. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

4. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

5. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum."

Umsitingin mælir til, at soljóðandi nýtt stk. 2 verður sett inn:

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingarnar í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini verða broyttar soleiðis at nýtt stk. 2 verður sett inn og kap. IV, §22 kemur at síggja soleiðis út.

**§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

3. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

4. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

5. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

6. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina**.**

**FUNDURIN LOKIN KL. 17.45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Ruth Vang | Birita Baldvinsdóttir Iversen |
| | Rói Bjarnason Poulsen | |